LÖGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Fylgiskjal 66

3. desember 2025
Mál: 25/26836

Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Ummælisskriv

Lógaruppskotið hevur ligið til ummælis á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni í 2 vikur, so at borgarar, privatir felagsskapir, áhugafeløg og myndugleikar fingu møguleikan at gera viðmerkingar til uppskotið. Inn komu 27 ummælisskriv.

Hesir partar hava sent ummælisskriv:

- Grímsfjall
- Húsavíkar kommuna
- Tvøroyrar kommuna
- Hagafelag Føroya
- Uffe Bærentsen
- Skúvoyar kommuna
- Sandoyar Tjóðveldisfelag, Sandoyar Fólkafloksfelag og Sandoyar Sambandsfelag
- Búnaðarstovan
- Jóannes í Dali
- Barbara Vang av Skarði
- Føroya Fuglafrøðifelag
- Tunnilsáhugabólkurin við Jón Sigurdsson, Kristian Stórhamar, Mourits Joensen
- Hvalbiar Kommuna
- Føroya Sílaveiðifelag
- Landsbankin
- P/F Suðuroyartunnilin
- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Landsverk
- FNU
- Náttúrufelagsskapir: Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, Hagafelagið, Føroya Sílaveiðifelag, Veltan og Føroya Fuglafrøðifelag
- Fíggjarmálaráðið
- Hagastýrið fyri Prestfjall, sunnari partur
- Umhvørvisstovan
- Helgi Nielsen
- Borgarstjórar í Hovs, Pokeris, Vágs og Sumbiar kommunum
- Óli Lassen
- Sands kommuna

Ummælisfreist og tilgongd
Fleiri ummælispartar vísa á, at ummælisfreistin er ov stutt. Hesum er Løgmansskrivstovan samd við vísandi til rundskrivi um lógarsmíð hjá Løgmálaráðnum, sum mælir til, at ummælisfreistir eru 4 vikur.

Upplýsast kann, at talan er stórt sæð sama uppskot, sum varð viðgjørt á Løgtingi í undanfarnu tingsetu, og sum fall burtur á ólavsøku (LM-072/2024).

Uppskotið var tá til ummælis í 5 vikur og vóru 34 ummælisskriv latin Løgmansskrivstovuni.

Løgmansskrivstovan hevði fundir við ymiskir myndugleikar bæði á lands- og kommunalum stigi og á stovnsstigi umframt við privatar áhugapartar.

Uppskotið fekk harumframt umfatandi viðgerð í fíggjarnevndini hjá løgtinginum.

Uppskotið, sum fyriliggur, er tillagað samsvarandi viðmerkingum og broytingum, sum meirilutin í fíggjarnevndini skrivaði í álitinum tann 28. apríl 2025. Harumframt tekur uppskotið støði í tilfari frá P/F Suðuroyartunlinum og ráðgeva teirra Norconsult umframt semjum í politiska fylgibólkinum.

Nógvir ummælispartar vísa á, at tað er átaluvert, at avvarðandi kommunur, hagapartar og viðkomandi myndugleikar ikki eru tikin við upp á ráð í sambandi við arbeiðið, tí talan er um eina stóra verkætlan, sum fer at hava umfatandi ávirkan á kommunur, hagar og umhvørvið.

Løgmansskrivstovan skilir og tekur undir við sjónarmiðunum hjá kommunum, hagapørtum, viðkomandi myndugleikum, áhugafelagsskapum og einstaklingum, sum meta, at tey í størri mun áttu at verið tikin við í arbeiðið fyrr í tilgongdini.

Tað er tó umráðandi at vísa á, at hildið verður fram at fyrireika verkætlanina soleiðis, at loysnir verða funnar, sum eru realistiskar, og taka atlit til bæði trygd, umhvørvi, trivnað, fíggjarlógina og soleiðis, at verkætlanin kann góðkennast av avvarðandi myndugleikum.

Viðkomandi partar verða tiknir við í víðari arbeiðið í tann mun, tað er viðkomandi.

Tað er eisini umráðandi at vísa á, at verkætlanin verður í tveimum stigum, og at hetta lógaruppskotið einans heimilar P/F Suðuroyartunlinum at fyrireika, prosjektera og bjóða út – ikki at fremja verkætlanina.

Uppskotið hevur verið til lógartekniska eftirkanning hjá lógartænastuni.

Samanumtøka av viðmerkingum, tillagingum og broytingum, sum eru gjørdar, síðani uppskotið varð sent til ummælis

Í sambandi við uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin eru innkomin fleiri ummælisskriv frá ymiskum myndugleikum, kommunum, felagsskapum og einstaklingum.

Løgmansskrivstovan vísir á, at fyrireikingarnar til undirsjóvartunlarnar, ið eru gjørdir í Føroyum, hava elvt til kjak, har ymisk og til tíðir mótstríðandi atlit møtast í sama orðaskifti.

Atlitini kunnu vera búskaparlig, umhvørvislig og samfelagslig, og hóast tey eru saklig í sjálvum sær, kunnu tey vera mótstríðandi. Ummælisskrivini geva sum heild eina fatan av, at hetta eisini er galdandi við hesi verkætlanini.

Politiskt er eitt ynski um at knýta Suðuroynna í meginøkið.

Búskaparliga standa Føroyar við haldførisavbjóðingum, um átøk ikki verða gjørd fyri at møta avbjóðingunum.

Umhvørvisliga verður víst á, at verkætlanin fer at gera stórt inntriv í náttúru og umhvørvi og er hetta ein kostnaður, sum eigur at viga nógv í avgerðini um linjuføring.

Samstundis má verkætlanin hava neyðugu trygdaratlitini og kunna fremjast á fíggjarliga skynsaman hátt.

Øll hesi atlitini eru ein natúrligur partur av eini verkætlan av hesi støddd og týdningi, sum fevnir um fleiri samfelagsøki og ávirkar bæði náttúru, lokalsamfeløg, vinnulív og samferðslu.

Sum heild er undirtøka millum ummælispartarnar fyri, at Suðuroyartunnilin verður gjørdur. Tað er ikki nakar ummælispartur, sum beinleiðis sigur seg vera ímóti, at Suðuroyartunnil verður gjørdur.

Tó verður víst á, at neyðugt er í størri mun at taka atlit til fíggjarstøðuna hjá landskassanum og fíggjarpolitiska haldførinum. Spurningur verður eisini settur við, um tíðin er tann rætta at fara undir stóru verkætlanina.

Nøkur vísa á, at tey fyrihalda seg ikki til spurningin um tunnilsverkætlanin skal gerast, men til ávís viðurskifti í verkætlanini, sum tey hava serkunnleika til ella serligan áhuga fyri.

Spurningur verður settur við, um málið er búgvið til støðutakan, og um linjuføringin millum Sandvík og Djúpadal norðan fyri Skarvanes og vegaføringar á Sandi og í Hvalba eru tær røttu.

Flestu ummælispartarnir vísa á, at størri atlit mugu takast til náttúruna, serliga í Sandoynni og eisini í Hvalba, og onkur vísir á náttúruna í Skúvoy. Víst verður serliga á, at Sandoyggin er serstøk - bæði tá tað snýr seg um fuglalív, landbúnað og vátlendi.

Nakrir ummælispartar mæla til, at ein innleiðandi og yvirskipað meting av árinum á náttúru (strategisk umhvørvisárinsmeting) verður gjørd av linjuføring millum Djúpadal og Sandvík og alternativu linjuføring millum Sandvík og norðan fyri Sandsbygd fyri at lýsa avleiðingarnar á umhvørvið og náttúruna av báðum farleiðum, áðrenn støða verður tikin til linjuføring.

Fleiri ummælispartar vísa á, at linjuføringin, sum tunnilsáhugabólkurin við Jón Sigurdsson, Kristian Stórhamar og Mourits Joensen mæla til norðan fyri Múlan er betri bæði fyri umhvørvið og náttúruna og fyri tey, sum skulu brúka farleiðina. Víst verður millum annað á, at alternativa farleiðin hevur við sær, at sleppast kann undan vega- og tunnilsgerð á Sandoynni, og at ferðatíðin verður styttri.

Nógv, millum onnur Sands bygdaráð, Skúvoyar kommuna, Húsavíkar kommuna, náttúru og umhvørvisfelagsskapirnir, tunnilsáhugabólkurin og Landsverk mæla tí til, at linjuføringin verður broytt.

Tey flestu vísa á, at neyðugt er at gera fleiri kanningar, áðrenn Løgtingið kann taka støðu til málið út frá haldgóðum grundarlagi.

Semja er í politiska fylgibólkinum um at halda fast í linjuføringini, sum P/F Suðuroyartunnilin upprunaliga hevur mælt til millum Sandvík og Djúpadal, og at ein atkomutunnil skal gerast til Skúvoyar.

Harumframt leggur løgmaður dent á, at tíðin er búgvin til, at løgtingið tekur støðu til tvey viðurskifti:

1. Skal Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fyrireikast, prosjekterast og bjóðast út?
2. Skal tað framvegis vera P/F Suðuroyartunnilin, sum hevur royndir frá væl eydnaðum verkætlanunum við Eysturoyar- og Sandoyartunlunum, sum er byggiharri og skal standa fyri fyrireikingararbeiðinum, prosjekteringini og útboðnum av verkætlanini?

Uppskotið, sum verður lagt fyri Løgtingið, er broytt nakað í mun til tað, sum var sent til ummælis.

§ 3 er broytt samsvarandi semju í politiska fylgibólkinum um at tilhoyrandi tunnils- og vegakervi á Sandoynni skal broytast soleiðis, at ferðslan millum Sandoyartunnilin í Traðardali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali verður leidd uttanum Sands bygd og landbúnaðarjørðina.

Løgmansskrivstovan skal upplýsa, at ein ætlan um at gera tunnil gjøgnum Traðarhamar er leysliga umrødd við Sands bygdaráð, men hevur ikki verið til ummælis, og at tað fyriliggja ikki fakligar metingar av, hvørjar umhvørvisligar og fíggjarligar avleiðingar ein møguligur tunnil gjøgnum Traðarhamar hevur, og hvønn mun tað ger á val av linjuføring.

Løgmansskrivstovan skal somuleiðis vísa á, at vegaføringar og tunnilsætlanir verða fyrireikaðar saman við bygdaráðunum og Umhvørvisstovuni.

Serligu viðmerkingarnar til ávísar ásetingar eru tó tillagaðar nakað við nærri útgreiningum fyri at beina burtur ivamál, sum eru komin fram í ummælisskrivunum.

Tilvísingar í §§ 5, 6 og 8 eru tillagaðar samsvarandi broyting í § 3.

§ 8, stk. 1 er broytt soleiðis, at tilvísingin til náttúruverndarlógina er røtt. Talan er um eina tekniska broyting.

Aðrar broytingar eru ikki gjørdar í sjálvum lógartekstinum, men serligu viðmerkingar til § 4 eru tillagaðar og nágreinaðar samsvarandi viðmerking frá Landsverki um ógreidleika viðvíkjandi góðkenningar og eftirlitsleiklutinum.

Ummælisskrivini eru viðfest sum fylgiskjøl 39-65 og ein samanskriving av øllum ummælisskrivum er viðløgd sum fylgiskjal 66.

Fleiri, sum hava sent ummæli inn í sambandi við hetta lógaruppskotið, hava viðfest áður sent ummælisskriv til LM-072/2024 um Suðuroyartunnil, sum fall burtur á ólavsøku. Tí verður eisini ummælisskrivið frá tí løgtingsmálinum viðfest fylgiskjali 66.

Niðanfyri verður heilt stutt greitt frá ummælisskrivunum. Víst verður annars til einstøku hoyringssvarini, sum eru løgd við lógaruppskotinum.

Samanskriving av hoyringarskrivum

Fyrireikingararbeiðið
Fleiri ummælispartar m.a. Landsverk, Føroya Arbeiðsgevarafelag og tunnilsáhugabólkurin gera vart við, at fyrireikingarnar til verkætlanina ikki er nóg gott grundarlag at taka støðu út frá.

Víst verður m.a. á, at endalig úrslit av jarðfrøðiligum kanningum mangla, at strategisk umhvørvisárinsmeting manglar og at fyriliggjandi kostnaðarmetingar eru óneyvar og ónøktandi. Eisini verður víst á, at kost-nyttugreiningar, sum eru gjørdar, ikki eru nøktandi.

Onkur ger vart við, at linjuføringin millum Sandvik og Norðan fyri Múlan ikki er viðgjørt eins nógv og upprunaliga tilmæli hjá P/F Suðuroyartunlinum.

Onkur vísir á, at tilfarið ikki er eftirmett av triðja-pørtum.

Upplýsast skal, at um uppskotið verður samtykt, verður arbeitt víðari við fyrireiking og prosjektering, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

Ætlanin er, at útbjóðingartilfarið verður góðskutryggjað av 3. parti, tá tað er liðugt, og áðrenn verkætlanin fer í útboð.

Tað vil siga, at tá verkætlanin verður boðin út, eru óvissurnar, sum eru í dag, munandi minni.

Vísast skal eisini til frágreiðingar, sum eru viðlagdar sum fylgiskjøl 1 - 38, ið fevna um forprosjekt, váðagreiningar viðvíkjandi eldsbruna, lýsingar av tekniskum loysnum í vandastøðum, kostnaðarmetingar, kostnað-nyttu greiningar, jarðfrøðiligar greiningar og figgjarligar avleiðingar. Heilt nógvar av hesum frágreiðingum eru eftirmettar av óheftum 3. pørtum, og liggja óheftu metingarnar eisini við sum fylgiskjøl.

Undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðan fyri Skarvanes og Sandvík við atkomutunli til Skúvoyar
Politisk semja er um, at halda fast í ta linjuføring, sum P/F Suðuroyartunnilin upprunaliga hevur mælt til millum Sandvík og Djúpadal, og at ein atkomutunnil skal gerast til Skúvoyar.

Alternativa uppskotið til linjuføring millum Sandvík og norðan fyri Sands bygd, er viðgjørt av P/F Suðuroyartunlinum og ráðgevum.

Landsverk vísir á, at linjuføringin norðan fyri Sands bygd er fakliga betri grunda og í samsvari við tilmæli um linjuføring hjá Landsverki frá 2021.

Sands bygdaráð, Húsavíkar kommuna, Skúvoyar kommuna, Umhvørvisstovan, náttúru og umhvørvisfelagsskapirnir, og tunnilsáhugabólkurin vísa á, at linjuføringin norðan fyri Múlan er betri.

Samanlagt metir P/F Suðuroyartunnilin, at linjuføringin norðan fyri Múlan er millum 500 mió. kr. og 1 mia. kr. dýrari og er hetta eitt tungtvigandi atlit í mun til samlaðu verkætlanina, sum longu er ein stór íløga.

P/F Suðuroyartunnilin vísir á, at fyritreytin fyri, at linjuføringin skal flytast norður um Sands bygd er at borað verður úr Skúvoy, tí tað verður ov langt at lufta út.

Landsverk ivast í hesi niðurstøðu hjá tunnilsfelagnum og metir, at tað ber til at bora frá Sandi til Skúvoyar og útlufta restina haðani

Tað ber sambært P/F Suðuroyartunnilin til at bora úr Skúvoy, men mett verður tó ikki, at tað er ráðiligt í mun til verkætlanar- og byggiváðar, uttan so, at havnin verður útbygd og eitt væl útgjørt byggipláss á 50.000 – 60.000 fermetrar verður sett av, meðan arbeiðið verður gjørt. Skúvoyar kommuna ger vart við, at kommunan tekur ikki undir við uppskotinum til arbeiðsøki/havn, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur skotið upp.

Politisk semja er um, at Skúvoy skal verða partur av samlaðu verkætlanini og at atlit skulu takast til støðuna hjá Skúvoy sum Ramsarøki.

Tilhoyrandi tunnils- og vegakervi

Sandvíkstunnil og vegaføring í Sandvík og í Hvalba
Hagapartar í Hvalba vísa á, at møguleikin fyri at gera tunnil undir bygdina eigur at verða kannaður nærri og at atlit verða tikin til vetrarbít, hagalendi og dýraflutning tá vegaføring verður gjørd í Hvalba.

Løgmansskrivstovan skal vísa á, at vegaføringar og tunnilsætlanin millum Hvalba og Sandvík verða gjørdar í samráð við Hvalbiar kommunu, og Umhvørvisstovuna.

Vegastrekkið millum Suðuroyartunnil og Sandoyartunnil í Sandoynni
Sands bygdaráð vísir á, at um hildið verður fast við linjuføringina Djúpadali, er tað eitt treytaleyst krav frá Sands kommunu at atkoman til Suðuroyartunnilin verður løgd uttan um Sandsbygd, bæði í byggitíðarskeiðnum og eftir at tunnilin er tikin í brúk.

Bygdaráðið vísir á, at eventuellar at knýttar verkætlanir at fremja hetta mugu verða við í útbjóðingini beinavegin, og verða framdar áðrenn byggingin av Suðuroyartunlinum fer av bakkastokki.

Politiski fylgibólkurin er samdur um at ganga ynskinum hjá Sands kommunu og lokalu politisku økisfeløgunum á møti.

Broytingar verða gjørdar í tilhoyrandi tunnils- og vegakervi á Sandoynni soleiðis, at ferðslan millum Sandoyartunnilin í Traðardali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali verður leidd uttanum Sands bygd og landbúnaðarjørðina.

Løgmansskrivstovan skal upplýsa, at ein ætlan um at gera tunnil gjøgnum Traðarhamar er leysliga umrødd við Sands bygdaráð, men hevur ikki verið til ummælis, og at tað fyriliggja ikki fakligar

metingar av, hvørjar umhvørvisligar og fíggjarligar avleiðingar ein møguligur tunnil gjøgnum Traðarhamar hevur og hvønn mun tað ger á val av linjuføring.

Løgmansskrivstovan skal somuleiðis vísa á, at vegaføringar og tunnilsætlanir verða fyrireikaðar saman við bygdaráðunum og Umhvørvisstovuni.

Umhvørvi og náttúra
Fleiri hoyringarpartar vísa á, at uppskotið tekur alt ov lítið atlit til umhvørvi og náttúru.

Fleiri hoyringarpartar gera vart við, at bæði í Suðuroynni og í Sandoynni eru serstøk náttúruøki við nógvum fjølbroyttum djóra-, plantu- og fuglalívi, sum hava týdning fyri økið og náttúruna í Føroyum sum heild, sum helst fara at verða ávirkað av verkætlanunum, og harumframt er Skúvoy útnevnd Ramsarøki.

Sum heild vísa hoyringarpartar á, at tað hevur alstóran týdning, at atlit verða tikin til náttúru- og umhvørvið, tá verkætlanir av slíkum slagi verða fyrireikaðar og framdar.

Nógvir og ymiskir umhvørvis- og náttúrufelagsskapir, Fuglafrøðifelag Føroya og Føroya Sílaveiðufelag mótmæla staðiliga linjuføringini millum Djúpadal og Sandvík og vísa á, at talan er um serstøk náttúruøki við fjølbroyttum fugla- og plantulívi, vátlendum og vøtnum, sum áttu at verið staðfest sum verndarøkið sambært umhvørvisverndarlógini.

Sands bygdaráð, Búnaðarstovan, Náttúrufelagsskapirnir o.o. vísa á, at vegaføringin gjøgnum Sands bygd liggur i bestu landbúnaðarjørð í Føroyum, og kemur at taka grundarlagið undir føroyskari framleiðslu av grønmeti v.m.., sum fer fram á Sandi. Onnur vísa á, at økt ferðsla gjøgnum Sands bygd ávirkar trivnaðin og trygdina hjá borgarunum.

Víst verður á, at linjuføringin norðan fyri Múlan tekur størri atlit til náttúru og umhvørvið.

Víst verður á, at linjuføringin millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík hevur ov stóra ávirkan á umhvørvi, tí tað verður gjørt ov stórt inntriv í Djúpadal, og ikki minst gjøgnum Sands bygd, um vegurin verður dagførdur soleiðis, sum skotið er upp.

Hagafelagið, FNU og Sílaveiðufelagið vísa á, at verkætlanin kemur at ávirka náttúruøki, vøtn, fugla- og djóralív óneyðuga nógv, og heita tí á politisku skipanina um at umhugsa aðrar loysnir, sum eru betri.

Bygdaráðini vísa eisini á, at tað er sera umráðandi, at atlit verða tikin til náttúru og umhvørvi í bygdunum og økjunum rundanum.

Nakrir hoyringarpartar mæla til, at ein innleiðandi og yvirskipað meting av árinum á náttúru (strategisk umhvørvisárinsmeting) verður gjørd av linjuføring millum Djúpadal og Sandvík og alternativu linjuføring millum Sandvík og norðan fyri Sandsbygd fyri at lýsa avleiðingarnar á umhvørvið og náttúruna av báðum farleiðum, áðrenn støða verður tikin til linjuføring.

Upplýsast skal, at uppskotið áleggur P/F Suðuroyartunlinum at gera eina umhvørvisárinsmeting av samlaðu verkætlanini fyri at lýsa hvørja ávirkan verkætlanin fer at hava á umhvørvið, náttúruna og

lívfrøðiliga margfeldi og inntriv í lendi, sum stendst av samlaðu verkætlanini fyri at avmarka ávirkanina á umhvørvið, náttúruna, og djóralív mesta møguliga.

Umhvørvisárinsmetingin skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan hevur mælt til, at § 8 stk. 1 verður broytt soleiðis, at tilvísingin til náttúrulógini er røtt. Talan er um eina tekniska broyting. Umhvørvisstovan mælir til, at umframt sjálvan undirsjóvartunnilin, skulu eisini landtunlar og vegir hava neyðuga umhvørvisgóðkenning. Løgmansskrivstovan skal vísa á, at vegir og landtunlar, sum eru gjørdir higartil í Føroyum, ikki hava umhvørvisgóðkenningar. Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir hava umhvørvisgóðkenning.

P/F Suðuroyartunnilin vísir á, at talan er um eina stóra og umfatandi verkætlan, sum kemur at hava ávirkan á umhvørvið óansæð, hvør loysn verður vald Víst verður á, at atlit verða tikin til náttúru og fólk bæði, meðan arbeitt verður og tá arbeiðið er liðugt. M.a. verða vegir í stóran mun lagdir omaná verandi vegir og lendi, sum verða tikin, eru longu upp dyrka jørð. Hædd verður eisini tikin fyri vøtnum í økinum.

Fyri at bøta um avleiðingarnar av verkætlanini, er politisk semja um at ganga ynskinum hjá Sands kommunu og lokalu politisku økisfeløgunum á møti. Broytingar verða gjørdar í tilhoyrandi tunnils- og vegakervi á Sandoynni soleiðis, at ferðslan millum Sandoyartunnilin í Traðardali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali verður leidd uttanum Sands bygd og landbúnaðarjørðina.

Løgmansskrivstovan skal upplýsa, at ein ætlan um at gera tunnil gjøgnum Traðarhamar er leysliga umrødd við Sands bygdaráð, men hevur ikki verið til ummælis, og tað fyriliggja ikki fakligar metingar av, hvørjar umhvørvisligar og fíggjarligar avleiðingar ein møguligur tunnil gjøgnum Traðarhamar hevur og hvønn mun tað ger á val av linjuføring.

Løgmansskrivstovan skal somuleiðis vísa á, at vegaføringar og tunnilsætlanir verða fyrireikaðar saman við bygdaráðunum og Umhvørvisstovuni.

Tá slíkar verkætlanir verða bodnar út, verða sett strong umhvørviskrøv til tær fyritøkurnar, sum skulu standa fyri byggingini. Tá farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, verða umhvørviskrøv sett til byggifyritøkuna, sum skal standa fyri byggingini.

Uppgávu- og myndugleikabýtið millum P/F Suðuroyartunnilin og Landsverk
Landsverk hevur víst á, at tað eigur at framganga greitt, at góðkenningar- og eftirlitsuppgávan hjá Landsverk verður framd undir ábyrgd mótvegis landsstýrisfólkinum í samferðslumálum.

Fyri at beina ivan hjá Landsverki burtur, er tað í serligu viðmerkingunum nágreinað, at Landsverk virkar undir tí landsstýrisfólki, sum sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi fráboðan um málsøkjabýti millum landsstýriskvinnur og landsstýrismenn, hevur heimildir mótvegis Landsverki.

Landsverk vísir á, at sum uppskotið er orðað, verður tunnilsfelagið vegamyndugleiki í tunlinum.

Hetta merkir, at landið letur myndugleikauppgávuna frá sær til eitt partafelag, og at landið tí ikki hevur eftirlitsmøguleika við eitt nú trygdina í tunlinum.

Vísandi til, at Landsverk sambært uppskotinum verður góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki er tað eisini partur av uppgávuni at hava eftirlit við, at tey trygdarátøk, sum verða góðkend av Landsverki, verða framd í tunlinum.

Landsverk vísir eisini á, at sambært uppskotinum verður tað uppgávan hjá Landsverk at góðkenna verkætlanirnar áðrenn útboð og aftaná, at tær eru lidnar.

Landsverk vísir á, at tað er ógreitt, hvussu hetta skal skiljast, tí tað skal gerast sambært góðkendum ætlanum.

Landsverk viðmerkir fleiri viðurskifti, sum Landsverk metir eru partur av myndugleikaviðgerðini, og Landsverk vísir eisini á, at í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður støða tikin til týðandi viðurskifti í tunlinum, eitt nú breidd, hall, íbinding til Skúvoy og trygdarum, ið gera tað trupult hjá Landsverki at verða myndugleiki tí hesa kunnu ávirka tunnilstrygdina.

Løgmansskrivstovan skal vísa á, at áhaldandi verður arbeitt við verkætlanini. Lógaruppskotið gevur heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út samlaðu verkætlanina, og upplýst er í viðmerkingunum, at ymsu partarnir í verkætlanini eru á ymiskum stigum í mun fyrireikingar og forprosjektering. Í mun til sjálvan undirsjóvartunnilin, verður m.a. arbeitt víðari við at greina og taka støðu til trygdarátøk, eins og vegateknisk viðurskifti.

Eisini verður farið undir góðkenningartilgongdina, sum er neyðug, áðrenn sjálv prosjekteringin kann fara ígongd. Tá prosjekteringin er liðug og góðkend verður farið undir at bjóða verkætlanina út.

At velja trygdarstig verður úrslit av eini tilgongd, sum er í gongd og heldur fram saman við prosjekteringini. Til ber ikki at brúka útlendskar trygdarásetingar beinleiðis, tí eingin standard finst fyri undirsjóvartunlar, sum eru so langir sum Suðuroyartunnilin, og sum hava so lítið av ferðslu, sum væntandi verður í Suðuroyartunlinum. Í víðari tilgongdini verða tí gjørdar fleiri váðametingar og kostnaðarmetingar fyri at áseta, hvørji trygdarátøk skulu vera partur av verkætlanini

Løgmansskrivstovan kann leggja afturat, at leypandi samskifti hevur verið bæði á politiskum stigi og á embætismannastigi, um myndugleikabýtið og hvussu góðkenningartilgongdin, og standardir v. m. kunnu fáast uppá pláss.

Ætlanin hevur verið og er framvegis, at Landsverk skal gera uppskot til góðkenningartilgongd og standardir, sum taka hædd fyri, at talan er um ein undirsjóvartunnil, sum er langur og hevur lága ferðslu.

Í hoyringarskrivinum vísir Landsverk á, at stovnurin í løtuni fyrireikar eina frágreiðing um góðkenningartilgongdina av Suðuroyartunlinum og verður henda latin avvarðandi pørtum í næstum.

Í serligu viðmerkingunum er nágreinað, at uppgávan hjá Landsverki er at góðkenna verkætlanina áðrenn farið verður víðari til sjálva prosjekteringina av verkætlanini og at uppgávan hjá Landsverk er at hava eftirlit við, at prosjekterað verkætlanin er í samsvari við tí góðkenning, sum fyriliggur, áðrenn verkætlanin verður bjóða út.

Leggjast kann afturat, at myndugleikabýtið áleggur eisini P/F Suðuroyartunnilin eina skyldu til leypandi at tryggja, at møguligar broytingar, sum verða gjørdar í verkætlanini undir fyrireiking og prosjektering, verða góðkendar av Landsverki áðrenn verkætlanin verður bjóða út.

Kostnaður og fígging
Løgmansskrivstovan hevur móttikið fleiri hoyringarsvar, ið viðvíkja kostnaðarmetingunum, fíggingini av verkætlanini, og óvissum í hesum sambandi. Aftrat hesum er eisini ávirkanin á fíggjarliga rásarúmið hjá landinum av stóru lántøkuni, sum verkætlanin krevur.

Landsbankin, Fíggjarmálaráðið, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Landsverk o.o. vísa serliga á spurningar um fígging, og búskaparligu og fíggjarligu avleiðingunum av verkætlanini Hesi hoyringarsvarini taka upp spurningar um haldførið hjá almenna búskapinum, um fíggingarleistin og kostnaðarmetingarnar fyri verkætlanina, og um, hvussu verkætlanin kann ávirka fíggjarliga rásarúmið hjá landinum komandi árini.

Landsverk vísir á, at kostnaðarmetingarnar hjá P/F Suðuroyartunlinum eru merktar av óvissu, og at metingarnar tykjast ov lágar.

Landsbankin ger vart við, at størsti váðin í ein verkætlan sum hesi, er byggiváðin, og at neyðugt er at politisku myndugleikarnir eru greiðir yvir, hvør ber kostnaðin av byggiváðanum.

Landsbankin leggur dent á, at samanberingin millum verandi farleið og tunnilin ikki kann brúkast sum grundarlag fyri støðutøku um verkætlanina.

Landsbankin vísir á, at rætta amboðið er ein *kostnað-nyttu-greining*, og at dagførda greiningin vísir eitt samfelagsbúskaparligt hall upp á uml. 900 mió. kr. (farleið 1A úr Djúpadali) og enn størri hall fyri alternativa linjuførslu norðan fyri Sands bygd.

Landsverk staðfestir, at munurin í kostnaði millum linjuføringarnar er lítil — uml. 2% — men at linjan úr Traðardali (2A) sambært einari greining við broyttum kostnaði kann hava størri samfelagsnyttu, m.a. vegna styttri ferðatíð, umframt ger minni inntriv í náttúruna.

Landsbankin ger vart við, at bæði land og kommunur hava hall á fíggjarlógini, hóast góðar búskaparligar tíðir, og at hallið væntast at vaksa munandi komandi ár vegna demografisku gongdina.

Landsbankin metir, at skuldbindingin fyri ein tunnil til Suðuroyar kann seta vælferðartænasturnar undir trýst.

Tí metir Landsbankin tað framvegis ikki ráðiligt at bora ein tunnil til Suðuroyar.

Fíggjarmálaráðið mælir til, at allar búskaparligar fyritreytir verða betri lýstar, áðrenn endalig verklagslóg um at fremja Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum verður løgd fyri Løgtingið.

Fíggjarmálaráðið vísir m.a. á, at neyðug átøk til at tryggja haldførið hjá landinum skulu vera samtykt, og at skuld og veðhaldsbindingar frá P/F Eystur- og Sandoyartunlum ikki longur skulu teljast upp í landsins skuld, áðrenn nýggj verkætlan verður sett í gongd.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við at fyrireika og projektera verkætlanina, men ikki at bjóða hana út, áðrenn kostnaðarmetingar og búskaparliga fyritreytirnar eru á pláss.

Bæði Fíggjarmálaráðið og Landsbankin vísa á, at verkætlanin fer at taka stórt rásarúm í fíggjarætlanini hjá landinum.

Løgmansskrivstovan skal vísa á, at endamálið við lógaruppskotinum er at fáa til vega ein meira nágreiniliga kostnaðarmeting av verkætlanini við at fyrireika, prosjektera og bjóða út Suðuroyartunnil og tilhoyrandi tunnils- og vegakerv. Samstundis sum arbeiðið við fyrireikingum, prosjektering og útbjoðing verður gjørt, kann eisini arbeiðast víðari við greiningum sum liggja aftanfyri uppskot til fíggingarleist.

Verkætlanin er í tveimum stigum, og hetta lógaruppskotið loyvir einans P/F Suðuroyartunlinum at fyrireika og loyvir ikki felagnum at fremja sjálva verkætlanina. Óvissan sum framvegis er um kostnaðin, er ikki tann so stórur trupulleikin, sum ávísir partar vilja vera við, á tí stigi sum verkætlanin er í løtuni.

Tá verkætlanin er prosjekterað, hevur verið í útboði og tilboð eru komin inn, er óvissan um kostnaðin nógv minni enn hon er nú. Partar av fyrireikingararbeiðinum, sum er gjørt higartil, er góðskutryggjað av óheftum 3. pørtum, og ætlanin er, at útbjóðingartilfarið eisini skal góðskutryggjast av 3. parti, tá tað er liðugt, og áðrenn verkætlanin fer í útboð.

Fíggjarligu avleiðingarnar av inniverandi uppskoti eru mettar 70 mió.kr. og játtan er á fíggjarlógini fyri 2025 og í uppskotinum til fíggjarlóg 2026.

Tá fyrireikingar og prosjektering eru lidnar og verkætlanin hevur verið í útboði, kann arbeiðið við haldførisavbjóðingini hjá tí almenna eisini vera komið longur enn í dag, og við verandi gongd í ferðslutølum og fíggjarliga úrslitinum hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar, er møguleiki fyri, at fíggjarligi váðin fyri landskassan av seinastu stóru tunnilsverkætlan er at kalla burtur um fá ár.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Tinganes, hin.12.02.2025
Málsnr.:24/23467

Ummælisviðgerð frá Løgmansskrivstovuni um innkomnar viðmerkingar

Í sambandi við uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils - og vegakervum komu 34 hoyringarskriv inn.

Hesi hava sent inn hoyringarskriv:

- Karl Martin Joensen
- Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag (FNU)
- Politisku flokkarnir í Sandoynni
- Jarðfeingi
- Sandsvíkshagin (Jóhan Eli Poulsen)
- Bárður Gunnarstein Nielsen
- Jóannes í Dali
- Zakarias Wang
- Hans Martin Lydersen
- Hagafelag Føroya
- Eggjahagin í Sandvík (Sylvan Poulsen)
- Húsavíkar og Skálavíkar kommuna
- Tjóðsavnið
- Búnaðarstovan
- Baldur og Barbara av Skarði
- Familjan Horn
- Vinnuhúsið
- Sands kommuna
- Umhvørvisstovan
- Sílaveiðufelag Føroya
- Hagaparturin Grímsfjall og undirliggjandi hagi
- Skúvoyar kommuna
- Hvalbiar kommuna
- Marianna Vang Simonsen
- Landsverk
- P/F Suðuroyartunnil
- Áhugafelagið Veltan
- Arkitektafelag Føroya
- Landsbanki Føroya
- Fíggjarmálaráðið
- Føroya Bóndafelag
- Yvirfriðingarnevndin
- Fámjins kommuna
- Tvøroyrar kommuna

Hoyringarfreist og tilgongd

Fleiri hoyringarpartar vísa á, at hoyringarfreistin hevur verið ov stutt.

Upplýsast skal, at uppskotið varð sent í almenna hoyring 8. november 2024 við freist til 6. desember 2024, og at hoyringarfreistin síðani varð longd til 12. desember 2024.

Harumframt varð skipað fyri 3 hoyringarfundum á Tvøroyri, á Sandi og í Havn (25.-27. november 2024).

Sambært rundskrivi hjá Løgmálaráðnum um lógarsmíð verður mælt til, at hoyringarfreistin er 4 vikur. Við longdu hoyringarfreistini var uppskotið til hoyringar í nærum 5 vikur.

Fleiri hoyringarpartar hava harumframt víst á, at tað er átaluvert, at avvarðandi kommunur, hagapartar og viðkomandi myndugleikar ikki eru tikin við uppá ráð í sambandi við arbeiðið, tí talan er um eina stóra verkætlan, sum kemur at hava umfatandi ávirkan á kommunur, hagar og umhvørvið.

Løgmansskrivstovan skilir og tekur undir við sjónarmiðunum hjá kommunum, hagapørtum, viðkomandi myndugleikum, áhugafelagsskapum og einstaklingum, sum meta, at tey í størri mun áttu at verið tikin við uppá ráð fyrr í tilgongdini.

Tað er tó umráðandi at vísa á, at hildið verður áfram at fyrireika verkætlanina soleiðis, at loysnir verða funnar, sum eru realistiskar, og taka atlit at trygd, umhvørvi, trivnað og fíggjarlógina, og soleiðis at verkætlanin kann góðkennast av avvarðandi myndugleikum.

Í sambandi við viðgerð av hoyringarskrivum hevur Løgmansskrivstovan havt fundir við ymiskar myndugleikar, bæði á lands- og kommunalum stigi og á stovnsstigi.

Harumframt hava fundir eisini verið millum P/F Suðuroyartunnil, hagapartar og jarðeigarar í økjunum kring tunnils- og vegastrekkini.

Endamálið við fundunum hevur verið at greiða øðrum frá verkætlanini, at hoyra sjónarmiðini hjá ávísum pørtum og at fáa greiðu á ymiskum ivamálum.

Harumframt hava fundir eisini verið millum P/F Suðuroyartunnil, hagapartar og jarðeigarar í økjunum kring tunnils- og vegastrekkini.

Samanumtøka av viðmerkingum, tillagingum og broytingum, sum eru gjørdar síðani uppskotið varð sent til ummælis

Løgmansskrivstovan hevur valt at viðgera sjónarmiðini og viðmerkingarnar til teir høvuðstættir, sum eru lýstir í almennu viðmerkingunum, avleiðingunum fyri umhvørvið og fíggjarligu avleiðingunum í viðmerkingunum til lógaruppskoti.

Viðmerkjast skal, at hoyringarskrivini ikki verða viðgjørd hvør sær í ummælisviðgerðini, og tað eru ikki allir hoyringarpartar, sum verða nevndir gjøgnum ummælisviðgerðina.

Hetta merkir ikki, at skrivini og viðmerkingarnar ikki eru umrødd ella viðkomandi. Tað ber bert ikki til at hava eina umfatandi viðgerð av hvørjum einstøkum skrivi.

Sum heild er undirtøka millum hoyringarpartarnir fyri, at Suðuroyartunnilin verður gjørdur. Tað er ikki nakar hoyringarpartur, sum beinleiðis sigur seg vera ímóti, at Suðuroyartunnil verður gjørdur.

Nøkur vísa á, at tey fyrihalda seg ikki til spurningin um tunnilsverkætlanin skal gerast, men til ávis viðurskifti í verkætlanini, sum tey hava serkunnleika til ella serligan áhuga fyri.

Spurningar verða tó settir við, um málið er búgvið til støðutakan, og um linjuføringin og vegaføringar á Sandi og í Hvalba eru tær røttu.

Fleiri hoyringarpartar vísa á, at størri atlit mugu takast til náttúruna, bæði í Hvalba og serliga í Sandoynni.

Harumframt verður eisini víst á, at neyðugt er í størri mun at taka atlit til fíggjarstøðuna hjá landkassanum og fíggjarpolitiska haldførið, og spurningur verður settur við, um tíðin er tann rætta at fara undir stóru verkætlanina.

Inniverandi uppskot, sum verður lagt fyri Løgtingið, er tillagað nakað í mun til uppskotið, sum varð sent til hoyringar.

Hildið verður fast í ta linjuføring, sum P/F Suðuroyartunnil hevur mælt til, og sum forprosjektið fevnir um.

Løgmansskrivstovan hevur biðið P/F Suðuroyartunnil um at meta um alternativu uppskotini, og hevur fingið eina frágreiðing. Løgmansskrivstovan hevur síðani biðið uttanhýsis ráðgevara, sum hevur drúgvar royndir við tunnilsverkætlanum, um at eftirmeta frágreiðingina frá P/F Suðuroyartunlinum.

Higartil eru ikki upplýsingar komnar í málinum, sum hava við at sær, at mett verður neyðugt at broyta linjuføringina úr Djúpadali norðanfyri Skarvanes til Sandvíkar.

Viðmerkjast skal tó, at arbeitt verður víðari við at greina jarðfrøðina og trygdina. Væntandi verður frágreiðing um jarðfrøðina klár í 2025 og tilmæli um trygdarátøk verður ætlandi liðugt í februar 2025.

Heldur enn at dagføra vegin gjøgnum Sands bygd, verður gjørdur ein vegur eftir Traðarhamri, eins og víst varð á sum ein møguleika í uppskotinum, sum varð sent til hoyringar.

Harafturat verður vegurin gjøgnum Sandslíð breiðkaður soleiðis, at farleiðin til eysturbygdirnar verður betri. Hetta er ikki partur av hesum lógaruppskoti, men verður skipað í øðrum.

Ætlanin er, at tað verður Landsverk, sum kemur at standa fyri tí partinum, og at landsstýrisfólkið við samferðslumálum kemur at leggja uppskot fyri Løgtingið um Sandslíð.

Heldur enn at kanna møguleikan at gera ein tunnilsarm til Skúvoy við møguleika at knýta oynna í Suðuroyartunnil seinni, verður møguleikin at gera ein atkomutunnil til Skúvoy við stýrdari og avmarkaðari ferðslu kannaður.

Fyri at fáa størri vitan um hvørjar avleiðingar samlaða verkætlanin kemur at hava á náttúru og umhvørvið er ásett í lógina, at umhvørvisárinsmeting skal gerast av samlaðu verkætlanini, og at undirsjóvartunnilin skal hava neyðuga umhvørvisgóðkenning.

Hetta er gjørt í samráð við Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna, sum hava víst á, at umhvørvisárinsmetingar ikki eru lógarásettar í Føroyum, og at tað lættir og styttir um málsviðgerina,

um tað verður staðfest, at undirsjóvartunnilin skal hava eina umhvørvisgóðkenning, tí sloppið verður undan at viðgera spurning sambært umhvørvislógini.

Meginparturin av grótinum frá undirsjóvartunlinum, sum kemur út sandoyarmegin, kann brúkast at fylla vegin eftir Traðarhamri upp við, heldur enn at staðseta grótið í Djúpadali. Avtala er gjørd við borgarstjórarnar í Suðuroynni um at gera eina ætlan fyri grótið, sum kemur út suðuroyarmegin. Sí annars nærri lýsing niðanfyri.

Upplýsast skal annars, at um uppskotið verður samtykt, verður arbeitt víðari við fyrireiking og prosjektering, áðrenn arbeiðið verður boðið út. Tað vil siga, at tá verkætlanin verður boðin út, eru óvissurnar, sum eru, munandi minni.

Undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðan fyri Skarvanes og Sandvík

Landsverk vísir á, at ymsar loysnir ikki eru kannaðar nóg væl, áðrenn linjuføring er vald. Landsverk hevur út frá yvirskipaðum fyrireikingum (eitt nú kost-nyttu greining) í 2021 mælt til eina linjuføring, sum gongur í framhaldi av Sandoyartunlinum norðan fyri Sands bygd, undir Skúvoy og til Sandvíkar.

Undir hoyringartilgongdini eru fleiri partar, sum hava víst á alternativar linjuføringar og loysnir fyri at fáa fast samband millum Suðuroynna og Sandoynna.

Sands kommuna hevur tikið stig til at fáa ein ráðgevarabólk at fyrireika og gera uppskot til alternativar møguleikar fyri, hvussu vegaføringin kann skipast. Uppskotið, sum er partur av hoyringarskrivinum frá Sands kommunu, varð lagt fram á borgarafundi á Sandi, fevnir um eina linjuføring, har tunnilin kemur upp norðan fyri Sands bygd, verður gjørdur undir Sands bygd og undir Skúvoy.

Jóannes í Dali hevur víst á uppskot, sum fevnir um at gera eina byrging til Skúvoyar, tunnil millum Skúvoy og Stóra Dímun og millum Stóra Dímun og Sandvík.

Húsavíkar og Skálavíkar kommuna vísa í felags hoyringarskrivi á, at tikið verður undir við, at tunnilin kemur upp í Djúpadali. Borgarstjórarnar vísa á, at tungídnaðurin í Sandoynni fyri ein part liggur á Eystursíðuni á oynni, og hann fer at vaksa munandi komandi árini, tí alivinnan ger stórar íløgur, sum koma at økja munandi um tungu ferðsluna gjøgnum Sandslíð.

Borgarstjórarnar vísa tó á, at ætlaða vegaføringin gjøgnum Sands bygd eigur at verða slept, og ístaðin eigur ein tunnil at gerast gjøgnum Sandslíð, sum kann koma út við Nýggjagarðar ella longur inni móti Meginskúlanum.

Síðani hoyringarskrivið varð sent Løgmansskrivstovuni hevur val verið og nýggj bygdarráð eru komin til. Borgarstjórin í Skálavíkar kommunu hevur á fundi við Løgmansskrivstovuna víst á, at støðan hjá bygdarráðnum er ikki broytt. Nývaldi borgarstjórin í Húsavíkar kommunu hevur hinvegin víst á, at hon tekur ikki undir við, at tunnilin verður gjørdur og als ikki, at tunnilin kemur upp á Skarvanesi.

Løgmansskrivstovan hevur biðið P/F Suðuroyartunnil um at viðmerkja og meta um hesar linjuføringar.

Tunnilsfelagið hevur svarað Løgmansskrivstovuni, at man hevur brúkt uppskot til linjuføring, sum arbeiðsbólkurin, ið Samferðslumálaráðið setti, hevur lagt fram í "Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein suðuroyartunnil" (fylgiskjal 15). Linjuføringin gongur tí úr Sandvík til Skarvanes, og er hendan kannað nærri í sambandi við forprosjektið.

Út frá eini heildarmeting av jarðfrøði, trygd og kostnað, verður hendan mett sum frægasta loysn. Tað er greitt, at kostnaðurin av undirsjóvartunlinum hevur vigað nógv í hesi niðurstøðu, tí greitt er beinanvegin, at kostnaðurin av verkætlanini er so stórur, at tað longu er á markinum fyri at vera møguligt. Niðanfyri verða viðmerkingarnar til jarðfrøði, trygd og kostnað viðgjørdar.

Jarðfrøði

Jarðfeingið hevur sent viðmerkingar og yvirskipað viðmerkt, at tær kanningar, sum upprunaliga vóru lagdar til rættis, eru lidnar. Hesar hava víst á, at tørvur er á fleiri kanningum, sum eru farnar í gongd og verða ætlandi lidnar í 2025. Í hoyringarskrivinum fyriheldur Jarðfeingi seg til jarðfrøðina og tær kanningar, ið hava til endamáls at lýsa hana, og harvið geva vitan, ið kann nýtast til at minka um váðar í sambandi við gerð av tunlinum. Jarðfeingi tekur í viðmerkingunum ikki støðu til, hvørt jarðfrøðin er trupul at gera tunlar ígjøgnum ella ikki.

Landsverk vísir á, at kanningar hjá Jarðfeingi vísa, at loysnin norðanfyri Sands bygd er betri jarðfrøðiliga. Ein frágreiðing frá ráðgevingarfyritøkuni Sintef (viðfest sum fylgiskjal 19) vísir hinvegin á, at út frá kendu jarðfrøðini er ikki tann stóri munurin á, um linjuføringin verður norðanfyri Sands bygd ella frá Djúpadali norðanfyri Skarvanes. P/F Suðuroyartunnilin hevur greitt frá, at hædd má eisini takast fyri, hvussu boringin av tunlinum fer fram, tá metast skal um, hvør loysn er betri jarðfrøðiliga.

Á teininum fram til Skúvoy fer linjuføringin frá Skarvanesi at krossa jarðfrøðiligu lagfestingina. Verður linjuføringin norðanfyri Sands bygd vald, fylgir linjuføringin lagfestingini. Sintef metir, at ávísur fyrimunur kann vera við at krossa lagfestingina. Tá komið er fram til Skúvoynna er jarðfrøðin so at siga tann sama.

Viðmerkjast skal, at bæði metingin hjá Landsverk og notatið hjá Sintef eru grundað á frágreiðingar frá Jarðfeingi, sum eru frá 2021, og at síðani tá hevur Jarðfeingi kannað fleiri boringar umframt gjørt feltarbeiði, og meira seismikkur er skotin. Hesar kanningar broyta sambært Jarðfeingi ikki yvirskipaðu myndina, men gera tað møguligt at gera eina munandi meira neyva meting av jarðfrøðini, sum ein tunnil av Skarvanesi vil ganga ígjøgnum. Nýggja frágreiðingin frá Jarðfeingi verður væntandi liðug í februar 2025.

Í hoyringartilgongdini hevur Løgmansskrivstovan havt fund við Jarðfeingi og eisini sent notatið frá Sintef til viðmerkingar hjá Jarðfeingi.

Jarðfeingið hevur ikki eyðmerkt skeivleikar í notatinum frá Sintef, men vísir á, at Jarðfeingi síðani 2021 hevur kannað fleiri boringar, gjørt feltarbeiði og meiri seismikkur er skotin. Jarðfeingi greiðir frá, at hetta sum so ikki hevur broytt yvirskipaðu myndina, men kemur at gera tað møguligt at koma við einari munandi neyvari meting av jarðfrøðini, sum ein tunnil av Skarvanesi vil ganga ígjøgnum.

Jarðfeingi greiðir frá, hvussu frágreiðingin er úrslit, sum kemur burturúr at seta saman feltarbeiði, boringar og jarðalisfrøðiligar kanningar til eina heildarmynd. Hendan heildarmyndin er grundarlagið undir jarðfrøðiliga tunnilsprofilinum, sum verður gjørdur í sambandi við, at endaliga rapportin verður skrivað.

P/F Suðuroyartunnil hevur víst á, at linjuføringin í tunnilsuppskotinum sum er gjørt fyri Sands kommunu, byrjar í einum ryggi millum Gróthúsvatn og Sandsvatn o.u. 300 metrar norðan fyri

prestagarðin á Todnesi. Hetta merkir, at áraka prestagarðin er tunnilslinjan (vegbreytin) komin 15 metrar niður. Tøtt bygging í Sands bygd liggur o.u. 500 metrar frá tunnilsmunnanum, og á tí staðnum er tunnilin komin 25 metrar niður.

Av tí, at tunnilin kemur at liggja beint undir bygdum øki við lítlari frástøðu til hús omanfyri, má roknast við, at neyðugt verður við meira varðligari spreinging undir Sands bygd, sum dýrkar arbeiðið. Um neyðugt verður við avmarkingum fyri, nær arbeiðast kann, er ikki greitt.

Í sambandi við tunnilsgerð undir Sands Bygd, má hædd takast fyri verandi og komandi jarðhitaholum, sum skulu hava eina ávísa frástøðu frá tunlinum.

Tunnilin liggur mitt millum tvey vøtn, og roknast má við injisering heilt tíðliga í tilgongdini, tí hellan óivað er vatmettað á staðnum. Injisering tætt við yvirflatuna, beint undir húsum og náttúru, er avbjóðandi og dýrkandi fyri prosjektið.

Tunnilslinjan er í váðametingini hjá Sweco 25,65 km long svarandi ein mun á 2,85 km av undirsjóvartunli í mun til stytstu leið.

Roknast má við, at tunnilslinjan hjá Landsverki kemur at liggja o.u. 2 km undir landi í Sandoynni.

Jarðfrøðisliga frágreiðingin frá Jarðfeingi í 2021 vísir á, at millum Sands bygd og Skúvoy er eitt uml. 26 metrar tjúkt sedimentbassin. Tað viðførir, at tunnilslinjan í hesum økinum má o.u. 135 metrar niður fyri at hava 50 metrar yvirdekning. Í mun til tunnilslinjuna hjá SUTU er hetta o.u. 30 metrar djúpri, og tað merkir, at botnpunktið í tunlinum verður uml. 30 metrar lægri, um talan ikki skal vera um tvær lagdir í tunlinum. Ein undirsjóvartunnil við tveimum lagdum var fráráddur í váðametingini, sum SUTU fekk gjørt fyri byggiskeiðið.

Trygd

Landsverk vísir á, at ivamál enn eru í sambandi við trygdina í tunlinum, og at tað er neyðugt at fáa greiðu á hesi ivamál.

Løgmansskrivstovan skal vísa á, at spurningurin um trygdina í tunlinum verður bæði tikin og viðgjørdur í størsta álvara. Tað má ikki verða nakar ivi um, at trygdin í tunlinum skal vera í lagi, bæði í byggitíðini og tá hann verður tikin í nýtslu.

Til ber ikki at brúka útlendskar trygdarásetingar beinleiðis, tí eingin standard finst fyri undirsjóvartunlar, sum eru so langir sum Suðuroyartunnilin, og sum hava so lítið av ferðslu, sum væntandi verður í Suðuroyartunlinum.

Tí er neyðugt at greina og gera av, hvussu eitt nøktandi trygdarstøði verður ásett, sum tekur atlit til føroysk viðurskifti.

P/F Suðuroyartunnil hevur víst á, at tað serliga er undirsjóvartunnilsarbeiðið, sum hevur stóran váða, tí arbeitt verður undir havyvirflatuni, eins og arbeitt verður gjøgnum tilfar, sum ongin kennir, fyrr enn komið er ígjøgnum, hóast jarðfrøðiligar forsagnir fyriliggja. Møgulig óhapp kunnu hava ovurhonds stórar avleiðingar, bæði fyri arbeiðsfólk, fyri samlaðu verkætlanina og fyri landið.

Tí verður frámælt, at undirsjóvartunnilin verður longri enn hægst neyðugt. Sintef vísir m.a. á, at hóast tað kann tykjast lítið at longja ein tunnil við 3-4 km, so kann hetta hava týðandi broytingar við sær fyri váðarnar í tunnilsverkætlanini.

Eins og upplýst er í viðmerkingunum til lógaruppskotið, eru gjørdar fleiri rapportir um trygdarspurningin av ymiskum fyritøkum.

Niðurstøðan hjá øllum pørtum er, at váðarnir at byggja og reka ætlaða Suðuroyartunnil kunnu handfarast.

Løgmansskrivstovan hevur fingið eina meting frá HOJ Consulting úr Sveis.

Landsverk vísir í hoyringarskrivinum á, at tað finnast fáir upplýsingar um fyritøkuna HOJ Consulting, og sáar iva um, hvørjar royndir fyritøkan hevur at framleiða ella eftirhyggja trygdar- og váðagreiningar.

Løgmansskrivstovan hevur síðani samskift við HOJ Consulting um viðmerkingina frá Landsverki.

Upplýsast skal, at talan er um eina fyritøku, sum hevur sera drúgvar royndir við tunnilsarbeiði. Svarið við yvirliti yvir verkætlanir, sum felagið hevur verið við í, umframt royndir hjá eigaranum, er viðfest sum fylgiskjal 18.

Í februar 2025 hevur Norconsult gjørt nýggja frágreiðing, sum greinar váðar og mælir til møgulig trygdartiltøk. Frágreiðingin verður partur av avgerðar grundarlagnum fyri, hvørji trygdartiltøk arbeiðast skulu víðari við í sambandi við prosjekteringina. Frágreiðingin er viðfest sum fylgiskjal 57.

Kostnaður

Bygdaráðið á Sandi vísir á, at munurin á kostnaðinum millum alternativa uppskotið og uppskotið hjá P/F Suðuroyartunlinum er lítil og ongin. Metingin sum liggur við alternativa uppskotinum er at meirkostnaðurin verður millum 282 og 466 mió. kr.

P/F Suðuroyartunnil hevur viðgjørt alternativa uppskotið og hevur víst á, at av tí, at tunnilin kemur at liggja beint undir bygdum øki við lítlari frástøðu til hús omanfyri, má roknast við, at neyðugt verður við meira varligari spreinging undir Sands bygd, sum dýrkar arbeiðið. Um neyðugt verður við avmarkingum fyri, nær arbeiðast kann, er ikki greitt.

Afturat hesum kemur eisini, at P/F Suðuroyartunnilin metir meirkostnaðurin av at longja tunnilin verða áleið 500 mió. kr., sum eisini er eitt atlit, ið vigar tungt í mun til samlaðu verkætlanina. Samanumtikið verður framvegis mett, at tunnilslinjan millum Skarvanes og Sandvík er tann frægasta, serliga eru tað atlitini til trygdina og kostnaðin, sum viga tungt.

Tilhoyrandi tunnils- og vegakervi

Í uppskotinum, sum var sent til hoyringar, varð víst á, at tunnil millum Sandvík og Hvalba, umfarsvegur í Hvalba og tunnilsvegur í Hvalba eru partar av forprosjektinum, men at talan ikki eru um endalig tilmæli um linjuføringar fyri vegir og tunlar frá undirsjóvartunlinum til landsvegin sunnanfyri Hvalba.

Eisini varð víst á, at tilhoyrandi tunnils- og vegakervi í Sandoynni ikki eru við í forprosjektinum, men at ætlanin var at fara undir at forprosjektera, um uppskotið verður samtykt.

Myndirnar, sum vóru í uppskoti, vísa tí ikki endaligar linjuføringar, sum liggja fast.

Víðari fyrireikingar, myndugleikakrøv o.a. skulu endaliga fastleggja, hvar vegaføringar og tunnilin skulu vera, áðrenn einstøku partarnir av verkætlanini verða prosjekteraðir.

Upplýsast skal, at einstøku verkætlanirnar eru á ymiskum stigum, tá tað snýr seg um fyrireiking, og at arbeitt verður víðari við verkætlanunum, um Løgtingið samtykkir inniverandi lógaruppskot.

Sandvíkstunnil og vegaføring í Sandvík og í Hvalba

Tá slík stór verkætlan verður gjørd skerst ikki burtur, at hetta ávirkar bæði umhvørvi og bygdina, sum heild.

Hoyringarpartar hava víst á ymisk hugskot um, hvussu vegaføringin skal verða gjøgnum Hvalba, og hvar og nær Sandvíkartunnilin eigur at verða gjørdur.

Hagaparturin Grímsfjall hevur m.a. víst á, at tunnilin úr Sandvík kann koma út mitt í bygdini og bindast í verandi landsveg framvið sandinum og fótbóltsvøllinum, ella at ein tunnil kann gerast undir bygdini, sum kemur út í Slokkunum við rundkoyring og íbindingum soleiðis, at sleppast kann undan at gera veg vestan fyri bygdina.

Hagaparturin Sandvíkshagin hevur víst á, at tað er gleðiligt, at Suðuroyartunnilin verður gjørdur, og at man er sinnaður at leggja lendi til bæði tunnilsmunnan og sambindingarvegin millum tunnilsmunnarnar, eftir vanligum treytunum. Hagaparturin vísir eisini á, at umkoyringar vegurin við tunnilsmunnan er væl staðsettur.

Hagaparturin Sandvíkshagin vísir tó á, at tað er ørkymlandi, at Sandvíkartunnilin ikki verður gjørdur fyrst. Tað verður økt ferðsla í sambandi við tunnilsarbeiðið, og harumframt skulu maskinur o.a. fáast til Sandvíkar. Tað er ivasamt um verandi tunnil ber øktu ferðsluna, og tað kemur at merkjast ógvusliga aftur í trivnaðinum hjá teimum, ið búleikast og hava sína dagligu gongd í Sandvík. Tí mælir Hagaparturin til, at farið verður í holt við Sandvíkartunnilin fyrst.

Hagaparturin Eggjahagi hevur víst á, at ætlaða linjuføringin fyri Sandvíkartunnilin kemur at hava stórar avleiðingar fyri hagapartin og traða eigarar, sum koma at verða avskorin frá linjuføringini. Hagaparturin mælir tí til, at linjuføringin verður flutt inn í Eggjahaga og vísir á, at loysnin viðførir, at tunnilin verður 50 m styttri, umframt at atkoman til hagapartin verður betri.

Løgmansskrivstovan hevur sent uppskotini frá hagapørtunum til viðmerkingar til P/F Suðuroyartunnil.

Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi vegakervum er ein umfatandi vegalinja, har atlit skulu takast til nógv ymisk viðurskiftir. M.a. jarðfrøði, geometri, vegastandardir, herundir ferðslutrygd. Tí verður hildið fast við verandi linju, men tá farið veður undir detail prosjektering verður í tann mun tað er møguligt, gingið ynskjunum frá hagapartinum Eggjahagi á møti, soleiðis at atgongd fæst til hagan og traðir v.m.

Hvalbiar kommuna hevur víst á, at tað er alneyðugt at taka undir við verkætlanini Suðuroyartunnil, og at tað er greitt, at tunnilin kemur at ávirka Hvalbiar sókn.

Víst verður á, at stórar vega- og tunnilsverkætlanir hava altíð ávirkan á náttúruna og nærumhvørvið, og at tað er av týdningi, at vegaloysnir verða so væl frágingnar sum gjørligt, umframt at tær ikki órógva grannaløg.

Kommunan hevur sett fram ynski um at fáa nærri kunning um, hvussu vegaloysnirnar í Hvalba og í Sandvík ítøkiliga verða framdar soleiðis, at kommunan eisini kann viðvirka til at góðar loysnir verða valdar, sóknini og fólkini at frama.

Í hoyringartilgongdini hevur Løgmansskrivstovan heitt á P/F Suðuroyartunnil um at taka upp samskiftið við bygdaráðið í Hvalbiar kommunu umframt viðkomandi hagapartar í Hvalba og Sandvík, sum verða mest ávirkaðir av eini møguligari vegaføring vestan fyri bygdina í Hvalba og vegaføringini millum Suðuroyartunnilin og Sandvíkar tunnilin í Sandvík.

Samskiftið er byrjað og fundir hava verið, sum mest hava snúð seg um, hvussu vegir og tunnil kunnu gerast, so ávirkanin á bygdirnar og umhvørvið verður minst møguligt.

Íbindingar í landsvegin hava verið umrøddar. Talan hevur verið um at gera eina íbinding við skúlan og eina íbinding í vegin til Hvalbiartunnilin soleiðis, at tað er lættari og skjótari hjá teimum, sum búgva miðskeiðis í bygdini at koma til og frá tunnilsvegnum.

Ynski er tó frá bygdaráðnum, at ongin íbinding verður við skúlan orsaka av ferðslutrygdini hjá skúlabørnunum.

Víst hevur verið á, at serlig atlit skulu takast til vøtnini, serliga Heygsvatn, har vegurin kemur tætt, og eiðini. Vegurin skal tillagast so, at hædd verður tikið fyri fornminnum nærhendis prestagarðin.

Tí verður arbeitt víðari við eini vegaloysn í Hvalba, sum kemur út við ruskplássið.

Hædd skal eisini takast fyri, at fleiri rættir koma at liggja innanfyri vegin soleiðis, at undirføringar mugu gerast fyri, at seyðurin skal kunna rása, av tí, at Hvalba ikki er vetrarfriðað. Eisini skulu ljóðforðingar gerast móti bygdini, har tað er møguligt.

Ætlanin er eisini at umskipa vegaføringina til Rituskorð soleiðis, at neyðugt ikki er at koyra til Sandvíkar fyri at koma vestur á Rituskorð. Ein íbinding skal gerast frá gamla landsvegnum niðri við Sandvíksá, og ein undirføring skal gerast undir nýggja vegnum millum Suðuroyartunnilin og nýggja Sandvíkartunnilin fyri at sleppa til Rituskorð, sum helst verður meira vitja, tá ein møguligur Suðuroyartunnil letur upp. Løgmansskrivstovan hevur somuleiðis havt fund við nývalda bygdaráðið í Hvalba, har greitt varð frá ætlanini, sum fyriliggur í Hvalba, og tí samskiftinum, sum verið hevur millum P/F Suðuroyartunnilin og hagarpartar, v.m.

Partarnir eru samdir um, at tætt samskiftið skal verða millum P/F Suðuroyartunnilin, hagapartarnar og Hvalbiar Kommunu frameftir, og at Løgmansskrivstovan leypandi verður kunnað um tær loysnir, sum partarnir verða samdir um.

Vegastrekkið millum Suðuroyartunnil og Sandoyartunnil í Sandoynni

Í uppskotinum, sum sent varð til hoyringar varð víst á, at farleiðin millum Líðarenda og Sandoyartunnilin, og farleiðin millum Líðarenda og Suðuroyartunnilin, ikki eru við í forprosjektinum.

Upplýst varð tó, at ymiskar loysnir eru umrøddar.

Nógvar viðmerkingar eru komnar til ætlanina um at dagføra veg gjøgnum Sands bygd frá bygdaráðnum á Sandi, myndugleikum, umhvørvisfelagsskapum og einstaklingum.

Løgmaður fekk handað 1.224 undirskriftir, sum mótmæltu ætlanini at gera vegaføring gjøgnum Sandsbygd. Bygaráðið á Sandi vísir í hoyringarskrivinum á, at sandingar ynskja á ongan hátt at forða fyri, at suðringar fáa sama møguleika, sum sandingar hava fingið við Sandoyartunlinum, og økta talinum av vitjandi, sum hevur verið í oynni, síðani tunnilin lat upp.

Tað er tó sera umráðandi fyri Sands kommunu at tryggja, at bygdin verður varðveitt í heilum og sunnum líki. Tí mótmælir bygdaráðið staðiliga ætlanini at leggja vegin gjøgnum Sands bygd eystan fyri ella vestan fyri Sandsvatn, sum vildi verið vanlukka fyri Sands bygd, sum vildi mist stór náttúruviðri, ið ikki fáast aftur, og vísir á, at uppskotini taka ikki atlit til verandi bygdalív, til landbúnað, verandi búsetingar ella framtíðar útbygging av Sands bygd.

Bygdaráðið mælir til, at uppskotið hjá ráðgevarabólkinum um, at Suðuroyartunnilin verður gjørdur undir Sands bygd og kemur upp norðanfyri bygdina, verður tikið við í viðgerðina, áðrenn endalig støða verður tikin til linjuføring.

Bygdaráðið vísir eisini á, at í lógaruppskotinum eru í veruleikanum bert tvey uppskot til vegaføring gjøgnum Sands bygd, tí triði møguleikin, sum er at leggja vegin uppi á Traðarhamar, er ikki nærri kannaður. Fyri Sands bygd hevði tað verið eitt kærkomið alternativ, at fingið møguleika at lagt vegin eftir Traðarhamri.

Bygdarráðið vísir eisini á, at tað er alneyðugt, at ein haldgóð loysn verður funnin á ferðsluni í sandoynni, tá hetta uppskotið verður samtykt. Tí vandi er fyri at ongin loysn verður funnin, tí fíggjarorkan til vegagerð á føroysku fíggjarlógini er smámunarlig, og sannlíkindini fyri at endin verður, at ferðslan verður leidd eftir verandi vegum í bygdini, tí eisini stór.

Bóndafelagið hevur m.a. víst á, at uppskotini til vegaføringarnar til tunnilsmunnan sandoyarmegin, leggja veglinjuna ígjøgnum bestu landbúnaðarjørðina í landinum, og at hetta er beinleiðis í andsøgn við ætlanina hjá samgonguni at vilja verja landbúnaðarjørðina ímóti bygging.

Bóndafelagið mótmælir uppá tað harðasta, at besta landbúnaðarjørðin, vit eiga í Føroyum, verður løgd undir asfalt.

Veltan hevur víst á, at vegaføringin gjøgnum Sands bygd kemur at taka grundarlagið undir føroyskari framleiðslu av grønmeti v.m., sum fer fram á Sandi.

Einstakir borgarar vísa harumframt á, at økta ferðslan gjøgnum Sands bygd, ávirkar trivnaðin og trygdina hjá borgarum, sum dagliga búgva á Sandi.

Avgerð er tikin um at arbeiða víðari við uppskotinum um at leggja vegin eftir Traðarhamri, og at uppskotini um veg gjøgnum Sands bygd verða slept.

Løgmansskrivstovan hevur heitt á P/F Suðuroyartunnil um at arbeiða víðari við eini vegaføring eftir Traðarhamri, og herundir eisini at taka upp samskiftið við avvarðandi hagapartar, sum verða ávirkaðir, um vegurin verður lagdur eftir Traðarhamri.

Løgmansskrivstovan hevur á fundi kunna nývalda borgarstjóran á Sandi um ætlanina.

Ætlanin er umrødd á bygdarráðsfundi í nývalda bygdaráðnum. Løgmansskrivstovan hevur fingið boð um, at meirilutin í nývalda bygdaráðnum tekur undir við at arbeitt verður víðari við ætlanini. Tveir bygdaráðslimir taka tó ikki undir við tí.

Borgarstjórar í Suðuroynni, í Skálavík og í Húsavík eru eisini kunnaðir um ætlanina. Sum heild tykist undirtøka verða fyri at leggja vegin eftir Hamaranum, hóast talan er um ein veg, sum kemur at liggja í eini hædd, sum kann vera avbjóðandi í mun til veðurviðurskifti. Tó skal upplýsast, at borgarstjórin í Húsavík vísti á, at hon ikki tekur undir við, at tunnilin verður gjørdur og als ikki, at tunnilin kemur upp í Djúpadali.

Talan verður um ein H1 veg, sum verður áleið 7,5 km langur.

Tað merkir tó eisini, at ferðslan millum Sandoyartunnilin í Traðardali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali skal upp í 215 metra hædd, sum er hægsta punkt á ætlaðu vegaføringini eftir Traðarhamri í staðin fyri 105 metra hædd, sum er hægsta punkt, um koyrt verður millum undirsjóvartunlarnir gjøgnum Sandalíð. At ferðslan skal góðar 100 metrar hægri merkir eina størri orkunýtslu.

Partur av vegnum kemur at liggja omanfyri 200 m hædd, og hevur Landsverk víst á, hóast talan møguliga er um eina loysn, sum samlað er betri enn vegirnir runt Sandsvatn, so eru royndirnar hjá Landsverki, at vegir omanfyri 200 m hædd fáa trupulleikar um veturin orsaka av vindi og kava. Uml. 1,4 km av vegnum liggur millum 200 og 210 m hædd og uml 0,5 km millum 210 og 215 m hædd.

Partur av fyrireikingararbeiðinum til vegin á Hamaranum verður at kanna veðurviðurskiftini. P/F Suðuroyartunnil hevur gjørt avtalu við SEV um at brúka teirra vindmodel, sum byggir á vindmátingar yvir nógv ár. Í fylgiskjølum 58 og 59 til lógaruppskotið verða veðurviðurskiftini á Traðarhamri viðgjørd. Arbeitt verður víðari við hesum, um Løgtingið samtykkir uppskotið

P/F Suðuroyartunnil hevur samskift við staðkend fólk og higartil er ikki komið fram á viðurskifti, sum benda á, at tað ikki ber til at gera ein nøktandi landsveg eftir Traðarhamri.

Tað kunnu vera lokal viðurskifti við t.d. vatni, sum verður blást upp frá fossunum í stormi, men mett verður, at hædd kann takast fyri hesum lokalt í tann mun tað er neyðugt.

Harumframt skal vísast á, at avgerð eisini er tikin um, at vegurin gjøgnum Sandslíð skal breiðkast soleiðis, at farleiðin til eysturbygdirnar verður betri. Hetta letur upp fyri møguleikanum at koyrast kann gjøgnum Sandslíð teir dagar, sum koyrandi ikki verður eftir Hamaranum. Eisini verður tunga ferðslan frá eysturbygdunum við hesum leidd uttanum bygt øki.

Skúvoy

Ætlanin um at Skúvoy skuldi takast við seinni er broytt. Heimild er nú í uppskotinum at fyrireika, prosjektera og bjóða út ein atkomutunnil til Skúvoy, sum hevur avmarkandi og stýrda ferðslu.

Skúvoyar kommuna hevur í hoyringarskrivi, og í samskifti við Løgmansskrivstovuna, víst á, at tað er umráðandi, at oyggin verður knýtt upp í Suðuroyartunnilin.

Sands bygdaráð hevur víst á, at skúvoyingar eiga at fáa ágóðan av tí metstóru íløgu, sum er í umbúnað.

Baldur og Barbara av Skarði vísa á, at pr. íbúgva er tað ikki dýrari at fáa skúvoyingar uppí, enn tað t.d. hevur kostað pr. íbúgva at gera Fámijnstunnilin. Í mun til Skúvoynna so hevði ein tunnil eisini spart landinum útreiðslur til Sildberan, og til nýtt skip, tá tað skal skiftast út, umframt ábøtur á havnina. Slíkar sparingar vóru ikki í eitt nú Fámjin, men kortini verður tann tunnilin gjørdur.

Løgmansskrivstovan hevur tikið viðmerkingarnar til eftirtektar, og í uppskotinum er nú ásett, at møguleikin fyri at gera ein atkomutunnil við avmarkaðari og stýrdari ferðslu skal kannast soleiðis, at politiska skipanin kann taka endaliga avgerð um Skúvoy skal knýtast í Suðuroyartunnilin ella ikki, tá avgerð skal takast um samlaða verkætlanin skal fremjast.

Orsøkin til at talan verður um ein atkomutunnil við avmarkaðari og stýrdari ferðslu, er, at tað er umráðandi at verja Skúvoy ímóti ov nógvari ferðslu og ferðafólki. Skúvoy er Ramsarøki, og hevur harumframt avmarkað pláss og møguleikar til økta ferðslu. Bygdaráðið í Skúvoy er kunnað um ætlanina, og tekur undir við uppskotinum, tí atlit verða tikin til borgarar, sum búgva har, og kann hjálpa til at skipa vaksandi ferðavinnuna og náttúruna í Skúvoy.

Ein møguligur atkomutunnil verður ætlandi gott 1,5 km langur, 5,5 m breiður og hallið verður uml.12,5%. Mett verður, at henda loysn kann gerast fyri uml. 150 mió. kr.

Uppgávu- og myndugleikabýtið millum P/F Suðuroyartunnil og Landsverk

Landsverk vísir á, at Landsverk eigur at standa fyri fyrireikingarbeiðinum, sum sambært Landsverki ikki er liðugt og nøktandi, og vísir harumframt á, at forprosjektið, sum P/F Suðuroyartunnil hevur staðið fyri, ikki er klárt at bjóða út.

Jóannes í Dali vísir á, at tað er átaluvert, at Tunnilsfelagið einans hevur "elligamlar" loysnir frá Landsverki at vísa á, og at felagið einans hevur arbeitt við ætlanini um eitt langt hol í uml. 2 ár.

Landsbankin heldur tað vera løgið, at fyrireikingin av verkætlanini ikki liggur hjá myndugleikanum á økinum (Landsverk), herundir serliga at velja linjuføring og áseta trygdarstig.

Her skal viðmerkjast, at Løgtingið í fíggjarlógini fyri 2022 játtar partapening til P/F Suðuroyartunnilin, og felagið er stovnað í 2022. Áðrenn partafelagið varð stovnað, vóru nakrar fyrireikingar gjørdar, sum Landsverk hevði staðið fyri. Løgtingslóg nr. 63 frá 22. Mai 2023 um ókeypis at avhenda ymiskt tilfar til P/F Suðuroyartunnilin tryggjaði, at alt tilfar frá fyrireikingararbeiðinum gjørdist tøkt hjá P/F Suðuroyartunlinum at arbeiða víðari við.

Við fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024 hevur Løgtingið játtað pening til, at partafelagið kann fyrireika og gera forkanningar til ein Suðuroyartunnil. Tað er sostatt tvey Løgting, sum hava avgjørt, at fyrireikingarnar verða gjørdar av partafelagnum Suðuroyartunlinum.

At P/F Suðuroyartunnilin hevur staðið fyri fyrireikingunum síðani tá, hevur sannlíkt givið eina øðrvísi tilgongd, enn um Landsverk framhaldandi stóð fyri arbeiðinum. Viðmerkjast skal eisini, at Landsverk mælir til eina aðra linjuføring fyri Suðuroyartunnilin enn hana sum P/F Suðuroyartunnilin mælir til, sum er tann, sum er partur av hesum lógaruppskotinum. Hetta er nærri viðgjørt aðrastaðni í hesum skjali.

At velja trygdarstig verður úrslit av eini tilgongd, sum er í gongd og heldur fram saman við prosjekteringini. Til ber ikki at brúka útlendskar trygdarásetingar beinleiðis, tí eingin standard finst fyri undirsjóvartunlar, sum eru so langir sum Suðuroyartunnilin, og sum hava so lítið av ferðslu, sum væntandi verður í Suðuroyartunlinum. Í víðari tilgongdini verða tí gjørdar fleiri váðametingar og kostnaðarmetingar fyri at áseta, hvørji trygdarátøk skulu vera partur av verkætlanini.

Løgmansskrivstovan skal eisini vísa á, at ætlanin er ikki, at forprosjektið, sum fyriliggur nú, verður bjóðað út í verandi líki.

Lógaruppskotið gevur heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út samlaðu verkætlanina, og upplýst er í viðmerkingunum, at ymsu partarnir í verkætlanini eru á ymiskum stigum í mun fyrireikingar og forprosjektering. Í mun til sjálvan undirsjóvartunnilin, verður m.a. arbeitt víðari við at greina og taka støðu til trygdarátøk, eins og jarðfrøðiliga frágreiðingin skal gerast liðug.

Eisini verður farið undir góðkenningartilgongdina, sum er neyðug, áðrenn sjálv prosjekteringin kann fara ígongd. Tá prosjekteringin er liðug og góðkend verður farið undir at bjóða verkætlanina út.

P/F Suðuroyartunnil er byggiharri

Avgerðin um, at øll verkætlanin verður samlað hjá einum parti – í hesum førinum P/F Suðuroyartunnilin – sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina, verður ikki broytt.

Politiska ynski er, at talan verður um eina samlaða verkætlan, sum fevnir um bæði undirsjóvartunnil og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi fyri at tryggja, at øll vegastrekki eru við, at verkætlanirnar verða samskipaðar, og at verkætlanin kann gerast á mest skynsama hátt búskaparliga.

Í uppskotinum, sum hevur verið til hoyringar, varð tó í almennu viðmerkingunum víst á, at politisk semja var um, at Landsverk skuldi fyrireika, prosjektera og bjóða út vegaføring í Sandoynni millum Líðarenda og Sandoyartunnilin.

Landsverk vísir á, at tað eru ógreið viðurskifti viðv. avleiddu verkætlanunum, og at Landsverk eigur at standa fyri verkætlanunum uttanfyri tunnilin, tí talan er um landsvegir og tunnil, sum verða avhendaðir landinum, tá arbeiðið er liðugt, og tí tað er í móti ásetingini í landsvegalógini, har tað stutt og greitt stendur, at landið ger og heldur landsvegir.

P/F Suðuroyartunnil vísir á, at uppbýtið av verkætlanini fer at fløkja ábyrgdarbýti og avmarkar møguleikarnar fyri synergi millum arbeiðstøkurnar, umframt at økja munandi um váðarnar í verkætlanini. Tað er stórur vandi fyri, at verkætlanin verður truplari og dýrari, um verkætlanin verður býtt upp við lóg, so sum skotið varð upp.

Eisini vísir P/F Suðuroyartunnil á, at vegurin frá Líðarenda til Djúpadal má vera partur av arbeiðinum hjá P/F Suðuroyartunlinum, tí teinurin hevur beinleiðis ávirkan á atkomu til tunnilsarbeiðið, og tí teinurin uttan iva verður dagførdur við tilfari frá tunnilsarbeiðinum.

Um vegurin frá Líðarenda til Sandoyartunnilin verður lagdur omaná Traðarhamri, kundi tað givið góða samvirkan við tunnilsverkætlanina, at tunnilsfelagið gjørdi teinin við tunnilstilfarið, sum varð koyrt beinleiðis út í vegalinjuna.

Vegagerð í Sandvík og Sandvíkartunnilin eru verkætlanir, sum í lógaruppskotinum liggja undir tunnilsfelagnum, og tað er skilagott og neyðugt í mun til samvirkan og atkomu.

Vegagerðin í Hvalba liggur í uppskotinum undir tunnilsfelagnum, sum er skilagott í mun til møguliga planlegging av atkomu og fleksibilitet hjá tunnilsarbeiðstakara.

Hinvegin er hesin teinurin ikki so avgerðandi í mun til atkomu, um verandi vegir verða brúktir til flutning. Teinurin skal vera liðugur, tá samlaða verkætlanin verður liðug.

Tað er týdningarmikið, at játtan og ábyrgd fylgjast.

Avgerð er tikin um, at P/F Suðuroyartunnil kemur at standa fyri allari verkætlanini, sum er fevnd av inniverandi lógaruppskoti.

Upplýsast skal tó, at landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum ætlandi kemur at leggja uppskot um at breiðka farleiðina gjøgnum Sandslíð fyri Løgtingið í næstum.

Landsverk, sum kemur at vera byggiharri fyri verkætlanini at breiðka Sandslíð

Í mun til ivamálið um, hvør er vegamyndugleiki, og hvat tað merkir, skal Løgmansskrivstovan vísa á, at "vegamyndugleiki" er fyrst og fremst tann, sum eigur vegin. Tað verið seg landið, kommunur, privatpersónar ella partafeløg, hvør so enn eigur partapeningin. Umframt er tann vegamyndugleiki, sum sambært heimild í lóg, hevur fingið serstakar heimildir á vegum, hvør so enn stendur sum ánari av vegunum.

Landsverk er "vegamyndugleiki" á øllum landsvegum, tí landið eigur vegirnar, og kann í kraft av sínum eigaraskapi ráða yvir teimum. Tá ið talan er um vegir, sum privat og partafeløg eiga, er Landsverk ikki vegamyndugleiki, uttan so, at lóggávan tilskilar Landsverki nakrar heimildir. Í galdandi lóggávu hevur Landsverk nærum ongar heimildir mótvegis privatum.

Men politiið hevur eina røð av heimildum á privatvegum og partafelagsognarvegum í ferðslulógini. Eitt nú, er tað politiið, sum eftir ferðslulóginni § 49, stk. 2, hevur vegamyndugleikan at beina burtur ljóslistaverk, sum eru til bága framvið vegum. Kommunan hevur eisini ávísar heimildir í ferðslulógini.

Tá ið Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi kervum er liðugur er ongin vegamyndugleikatrupulleiki. Tá verður alt kervið uttanfyri sjálvan Suðuroyartunnilin avhendað landinum og gerst vanligur landsvegur. Landsverk gerst tá vegamyndugleiki í kraft av eigaraskapinum.

Sjálvur Suðuroyartunnilin er, aftaná at liðugt er, enn partafelagsogn. Partafelagið ræður yvir tunlinum, og Landsverk hevur ongar heimildir í honum. Politiið og kommunurnar hava tær heimildir, sum nú einaferð eru í ferðslulógini og øðrum lógum.

Landsverk skal góðkenna og hava eftirlit við verkætlanini

Advokaturin hjá Landsverki hevur víst á, at tað framgongur ikki beinleiðis av lógartekstinum, hvat liggur í uppgávuni at verða góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki.

Víst verður m.a. á, at tað í serligu viðmerkingunum til § 5, at tað er við atliti til ferðslufakligu dygdina, trygdina og samskipanini við landsvegakervið annars. Eisini at normar og standardir, sum eru galdandi á økinum verða hildnir. Men tað er ikki bara, sum sagt verður, at ferðslufakliga dygdin skal vera í

ordan. Tað er eisini tað vegatekniska, t.v.s. hvussu vegir eru bygdir upp, og alt annað, sum hevur tilknýti til hetta, skal Landsverk kunna seta krøv til og góðkenna.

Í serligu viðmerkingunum til § 7 er nú nágreinað, at talan er um vegatekniska og ferðslufakliga góðkenning, og at góðkenningin fer fram eftir standardum, sum Landsverk brúkar, og sum eru galdandi á økinum, tá hetta lógaruppskotið er samtykt.

Landsverk skal, sambært uppskotinum, góðkenna samlaðu verkætlanina sambært standardum og normum, sum eru galdandi, og skal eisini hava eftirlit við, at verkætlanin verður framd sambært góðkendum ætlanum.

Landsverk hevur umvegis advokat, Óla Jákup Christoffersen, víst á, at tað finnast ikki lógarásettir standardir og normar, og at stovnurin sjálvur ofta brúkar norskar standardir, ið eru tillagað føroysk viðurskifti, tá vegir og tunlar verða gjørdir.

Løgmansskrivstovan skal vísa á, at Landsverk eisini hevur verið góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki, tá ið aðrir undirsjóvartunlar eru gjørdir í Føroyum, og tá hava heldur ikki verið lógarásettir standardir.

Tá Landsverk stendur fyri verkætlanum at gera landsvegir eru ongir lógarásettir standardir fyri, hvussu teir skulu gerast. Landsverk stendur fyri at byggja og viðlíkahalda teir eftir teimum standardum, sum teir sjálvir leggja til grund, ið sum oftast eru onkrir norskir standardir við tillagingum til føroysk viðurskifti, sum Landsverk sjálvt ásetur.

Í Suðuroyartunnilsprojektinum er munurin bara tann, at nú er tað P/F Suðuroyartunnilin, sum byggir við góðkenning frá Landsverki. Normurin fyri standardunum, sum byggjast skal eftir, er akkurát tann sami, sum um Landsverk sjálvt hevði bygt, sum jú er á rættuliga óformligum grundarlagi.

Advokaturin hjá Landsverk hevur eisini víst á, at tað er neyðugt at áseta í lógini, at P/F Suðuroyartunnil skal útvega alt viðkomandi tilfar til Landsverk, og neyðugt er at áseta, at broytingar, sum verða gjørdar, tá ið verkætlanin er liðug og tikin í brúk, eisini skulu góðkennast av Landsverki.

Løgmansskrivstovan metir ikki, at tað er neyðugt at áseta hetta í lóg.

Tá ið umræður eftirfylgjandi dagføringar er ongin trupulleiki við kervinum uttanfyri sjálvan tunnilin. Tað er vorðið landsvegur og gongur eftir landsvegareglunum. Dagføringina av Suðuroyartunlinum stendur P/F Suðuroyartunnilin fyri eftir lógaruppskotinum.

Í lógunum um hinar undirsjóvartunlarnar eru ongar reglur um dagføringar, og í tey nærum 25 árini, sum undirsjóvartunlar hava verið, hevur dagføringartrupulleikin kanska verið minni har enn á landsvegakervinum.

Um innlit Landsverks í alt viðkomandi tilfar í sambandi við góðkenningarvirksemi sítt, er at siga, at har er helst ikki neyðugt við nøkrum lógarreglum um tað.

Fær Landsverk ikki innlit í alt viðkomandi tilfar, fær Landsverk ikki útint sítt góðkenningarvirksemi, og góðkenning kemur ikki uppá tal, fyri enn tilfarið er fingið til vega, so tað loysir seg sjálvt. P/F Suðuroyartunnilin noyðist at útflýggja tilfarið, annars steðgar verkætlanin upp.

Umhvørvi

Fleiri hoyringarpartar vísa á, at uppskotið tekur alt ov lítið atlit til umhvørvi og náttúru.

Víst verður á, at linjuføringin millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík hevur ov stóra ávirkan á umhvørvi, tí tað verður gjørt ov stórt inntriv í Djúpadal, og ikki minst gjøgnum Sands bygd, um vegurin verður dagfærdur soleiðis, sum skotið er upp.

Hagafelagið, FNU og Sílaveiðufelagið vísa á, at verkætlanin kemur at ávirka náttúruøki, vøtn, fugla- og djóralív óneyðuga nógv, og heita tí á politisku skipanina um at umhugsa aðrar loysnir, sum eru betri.

Umhvørvisstovan vísir á, at økini við Søltuvík, Mølheyggjar, Gróthúsvatn, Sandsvatn, Stóravatn og Lítla vatn í Sandoynni og Heygsvatn og Norðbergsvatn í Hvalba hava í sær stór náttúruvirðir, so sum sjáldsamar plantur, fugl og serlig jarðfrøðilig fyribrigdi. Stór sannlíkindi eru fyri, at talan er um øki, sum sambært kapittul 4 um økisvernd í náttúrverndarlógini, eiga at verða vard.

Tjóðsavnið vísir eisini á, at víðfevnd vegagerð og økt ferðsla í økinum kunnu elva til óbótaliga skaða á náttúrumargfeldið, og at øll inntriv framvið eitt av fáu friðaðu økjum, Mølheyggjar á Sandi, krevja sera góða grundgeving.

Bóndafelag Føroya, Búnaðarstovan, Veltan o.o. vísa á, at vegaføringin gjøgnum Sands bygd liggur i bestu landbúnaðarjørð í Føroyum, og kemur at taka grundarlagið undir føroyskari framleiðslu av grønmeti v.m., sum fer fram á Sandi. Onnur vísa á, at økt ferðsla gjøgnum Sands bygd ávirkar trivnaðin og trygdina hjá borgarunum.

Bygdaráðini vísa eisini á, at tað er sera umráðandi, at atlit verða tikin til náttúru og umhvørvi í bygdunum og økjunum rundanum.

Løgmansskrivstovan skilir og tekur undir við sjónarmiðunum um, at tað er alneyðugt, at størri atlit verða tikin til náttúru og umhvørvi, tá verkætlanin verður fyrireikað og prosjekterað.

Samstundis skal Løgmansskrivstovan vísa á, at tað er ein sannroynd, at talan er um eina stóra og umfatandi verkætlan, sum kemur at hava ávirkan á umhvørvið óansæð, hvør loysn verður vald.

Málið er at finna loysnir, sum bera til at gjøgnumføra við atliti at jarðfrøði, trygd, umhvørvi og kostnað.

Frágreiðing og umhvørvisgóðkenning

Í uppskotinum, sum varð sent til hoyringar, varð í viðmerkingunum víst á, at umhvørvisárinsmeting skal gerast, og at verkætlanin skal hava umhvørvisgóðkenning eftir sama leisti sum Eysturoyar- og Sandoyartunnilin.

Umhvørvisstovan hevur í hoyringarskrivi víst á, at sambært umhvørvisverndarlógini mugu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, ið eru at finna í fylgiskjalinum til lógina, ikki verða gjørd ella farin undir, fyrr enn góðkenning er givin til slíkt. Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi, og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Tunnils- og vegagerð er ikki nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina. Umhvørvisstovan hevur tó, sambært § 28 í lógini, kravt, at umhvørvisgóðkenning skuldi gerast fyri Eysturoyar- og

Sandoyartunlarnar. Grundgevingin fyri kravinum um umhvørvisgóðkenning var m.a., at verkætlanirnar eru millum tær størstu í Føroyum nakrantíð, at verkætlanirnar hava eitt útlát av dálkandi evnum, óljóði, ristingum o.a., umframt at verkætlanirnar fara fram í fleiri kommunum, og at tað tí kann verða trupult at hava eitt nøktandi umhvørviseftirlit í byggitíðini.

Við somu grundgevingum metir Umhvørvisstovan, at krav um umhvørvisgóðkenning eigur at verða partur av uppskotinum til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum, har treytir verða settar til m.a. goymslur, sprongt grót og leivdir av spreingileidningum úr plasti, spillivatn, óljóð, ristingar, ljós, burturkast og innaneftirlit.

Umhvørvisstovan hevur somuleiðis víst á, at tað ikki er ásett í lóg, at umhvørvisárinsmetingar skulu gerast í sambandi við verkætlanir og mælir til, at tað verður ásett í inniverandi lógaruppskot.

Fyri at fáa størri vitan um, hvørjar avleiðingar samlaða verkætlanin kemur at hava á náttúru og umhvørvið, er ásett í lógina, at umhvørvisárinsmeting skal gerast av samlaðu verkætlanini, og at undirsjóvartunnilin skal hava neyðuga umhvørvisgóðkenning.

Hetta er gjørt í samráð við Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna, sum hava víst á, at umhvørvisárinsmetingar ikki eru lógarásettar í Føroyum, og at tað lættir og styttir um málsviðgerina, um tað verður staðfest, at undirsjóvartunnilin skal hava eina umhvørvisgóðkenning, tí sloppið verður undan at viðgera spurning sambært umhvørvislógini.

Sum sagt, er avgerð tikin um, at ferðslan ikki skal ganga gjøgnum Sands bygd, og at vegur skal gerast eftir Traðarhamri. Harvið verður ávirkanin á nátturuna rundanum Sands vatn, landbúnaðarjørðina, trivnaðin og trygdina hjá borgarum á Sandi avmarkað.

Grót

Spurningurin um, hvar grótið frá Suðuroyartunlinum skal goymast, fyllir eisini nógv í hoyringarskrivunum.

Landsverk vísir á, at tað framgongur ikki av tilfarinum, sum fylgir við lógaruppskotinum, hvat grótið skal nýtast til, annað enn at leggja tað beint uttanfyri tunnilin. Spurningur kann eisini setast við, um tunnilsfelagið hevur tikið hædd fyri allari mongdini av gróti, serliga tá hugsað verður um, at Sandvíkar- og Sandarlið-tunnil eisini skulu gerast. Landsverk ger vart við, at arbeitt eigur at verða við at finna loysnir fyri grótinum, soleiðis at neyðug atlit verða tikin til m.a. náttúru og umhvørvi.

Umhvørvisstovan vísir á, at ein ítøkilig ætlan fyri staðseting og nýtslu av avlopsgrótinum frá tunnilsarbeiðinum eigur at verða lýst í eini árinsmeting av samlaðu verkætlanini.

Sandvíkshagin mælir til aðra staðseting til grótið, sum kemur úr ætlaða Suðuroyartunlinum, og hevur ítøkiligt uppskot um at staðseta grótið á einum øki í Sandvík, sum eitur Mýrarnar, sum er áleið 120.000 fermetrar.

Hagaparturin Eggjahagi vísir eisini á, at lendi í hagapartinum er slitið, og at partur av grótinum bøta um graslendi í haganum.

Løgmansskrivstovan tekur undir við viðmerkingunum um týdningin av, at ein haldfør loysn verður funnin á grótinum, og at loysnirnar, sum vóru í uppskotinum, ikki eru nøktandi.

Upplýsast skal, at meginparturin av grótinum frá undirsjóvartunlinum sandoyarmegin kann brúkast at fylla vegin eftir Traðarhamri upp við, heldur enn at staðseta grótið í Djúpadali.

Tað eru tó eisini mótsigandi sjónarmið um, hvat ein nøktandi loysn fyri grótinum er. Tjóðsavnið hevur á fundi við Løgmansskrivstovuna víst á, at tað er eitt stórt inntiv í náttúruna á Sandi at leggja ein veg eftir Hamaranum og vísir eisini á, at tað er umráðandi at hugsað verður um, hvussu stórur partur av jørðini í Føroyum verður brúkt til landbúnað. Tað er ikki nógv óspilt lendi eftir.

Hagarpartar vísa á, at grótið kann brúkast til at betra um lendið, meðan Tjóðsavnið vísir á, at tað er sera umráðandi, at mýrulendi verða varðveitt. Onkur vísir á, at tað kann vera ein fyrimunur at goyma grótið soleiðis, at tað er tøkt, tá grót skal brúkast til ymiskar verkætlanir, meðan onnur vísa á, at grót kann vera skemmandi fyri náttúruna.

Løgmansskrivstovan hevur heitt á P/F Suðuroyartunnilin um at arbeiða víðari við eini loysn fyri grótið, og hevur harumframt havt fund við borgarstjórar í Suðuroynni. Tvøroyrar kommuna hevur brúk fyri ein stórum parti av grótinum, og hinar kommunurnar vóru opnar fyri at kanna, um tær kunnu taka ein part av grótinum. Avtalað varð, at borgarstjórarnir venda aftur við eini ætlan fyri grótið í Suðuroynni.

Upplýsast skal, at yvirfriðingarnevndin hevur víst á, at verkætlanin helst kemur at krevja góðkenning sambært náttúrufriðingarlógini, herundir § 4, og hevur tí heitt á avvarðandi myndugleikar um at taka nattúrufriðingarmyndugleikarnar við í tilgongdina. Yvirfriðingarnevndin vísir á, at royndirnar frá øðrum stórum verkætlanum vísa, at tað kann gerast óskynsamt, um bíðað verður at taka myndugleikar við til seint í tilgongdini. Fundur hevur verið við umboð fyri náttúrufriðingarnevndina, sum hevur víst á, at tað helst verður avgerandi fyri teirra viðgerð, at ein betri loysn verður funnin á grótinum.

Tunnilsmunnar og arbeiðsvegir

Spurningur er eisini settur við, hví heimild er í uppskotinum til at gera tunnilsmunnar og arbeiðsvegir, áðrenn endalig avgerð er tikin til at fremja verkætlanina. Hagaparturin Sandvíkshagin vísir á, at tað tykist løgið at fara undir tunnilsmunnan, áðrenn sjálv verkætlanin er endaliga samtykt. Tað kann í ringasta føri hava við sær, at hagin stendur eftir við stórum, ljótum og nyttuleysum sárum í náttúruni.

Løgmansskrivstovan hevur tikið viðmerkingarnar til eftirtektar og heimildin er strikað. Hetta merkir, at tunnilsmunnar og arbeiðsvegir eru partur av fyrireiking, prosjektering og útbjóðing av samlaðu verkætlanini. Tað merkir tó ikki, at P/F Suðuroyartunnil ikki kann gera neyðugar kanningar av tunnilsmunnunum og vegaføringunum.

Tað er órealistiskt at ímynda sær, at tað ber til at gera ein undirsjóvartunnil millum Suðuroynna og Sandoynna, uttan at tað kemur at hava ávirkan á umhvørvið, bæði í Sandoynni og í Suðuroynni. Tað hevur eisini verið fatanin á fundunum, at partarnir hava forstáilsi fyri hesum sjónarmiði. Men tað er sjálvsagt, at tað eru eisini nógvar ymiskar meiningar og áhugamál í sambandi við eini so stórari verkætlan.

Málið er framhaldandi at finna eina loysn, sum hevur minst møguliga ávirkan á umhvørvið og trivnaðin hjá fólki, uttan at hetta gongur út yvir trygdina, bæði í byggitíðarskeiðinum, og tá verkætlanin er liðug, og sum kann gerast innanfyri ein ábyrgdarfullan fíggjarkarm.

Kostnaður og fígging

Í sambandi við forprosjektið hevur Norconsult gjørt kostnaðarmeting av uppskotinum til undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes í Sandoynni og Sandvík í Suðuroynni, og LBF gjørt kostnaðarmeting av atknýttum vegum og tunlum í Suðuroynni. Seinni er gjørd ein leyslig kostnaðarmeting av vegnum eftir Traðarhamri. Óvissa er við hesum kostnaðarmetingum, men hesar óvissur gerast nógv minni, eftir at arbeiðini hava verið í útboði og tilboð eru komin inn.

Løgmansskrivstovan setti í 2023 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til fíggingarleist fyri ein Suðuroyartunnil. Í bólkinum hava verið fólk úr Løgmansskrivstovuni, Fiski- og Samferðslumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Landsbankanum og P/F Suðuroyartunlinum. Arbeiðsbólkurin hevur fingið tilfar frá somu pørtum, og harumframt hava fólk frá Strandfaraskipum Landsins, Landsverki og Nordea lagt fram fyri arbeiðsbólkinum.

Uppskotið til fíggingarleist er lýst í fylgiskjali 11.

Hóast Landsbankin hevur verið við í arbeiðsbólkinum, hevur stovnurin skrivlig fyrivarni, sum liggja við sum fylgiskjal 12.

Landsbankin hevur harumframt sent hoyringarsvar inn. Fíggjarmálaráðið hevur eisini sent hoyringarsvar inn.

Fíggjarliga haldførið hjá almenna búskapinum

Landsbankin førir í fyrivarnisskrivinum fram, at atlit ikki verða tikin til fíggjarpolitiska haldførið og rásarúmið. Fíggjarmálaráðið mælir frá, at fara í gongd við verkætlanina, fyrr enn neyðug átøk at tryggja haldførið hjá landinum í stutta og langa siktinum eru samtykt av Løgtinginum,

Løgmansskrivstovan heldur ikki tað er rætt at siga, at atlit ikki verða tikin til fíggjarpolitiska haldførið og rásarúmið, og skal vísa á, at í almennu viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg, verður bæði víst á, at Landsbankin og onnur hava ávarað ímóti at gera eina so stóra íløgu sum ein Suðuroyartunnil, umframt upplýst, hvussu politiski fylgibólkurin hevur havt hetta við í síni viðgerð, og er komin fram til, at tað kortini er rætt at gera fast samband millum Suðuroy og Sandoy.

Løgmansskrivstovan skal eisini vísa á, at síðani Búskaparráðið í 2014/15 vísti á manglandi haldføri í almenna búskapinum, hevur tað verið viðgjørt av politisku skipanini og verið partur av fíggjarpolitiska arbeiðinum. Eftir at Búskaparráðið í 2024 gjørdi eina nýggja greining, og víst á manglandi haldføri, hevur løgmaður sett serligt fokus á hetta, og hevur sett gongd á eina meira skipaða tilgongd at viðgera fíggjarliga haldførið hjá almenna búskapinum politiskt. Eitt nú hevur uppskot um hægri pensjónsaldur verið til hoyringar, og verður hetta viðgjørt breitt í politisku skipanini.

Fíggjarmálaráðið mælir frá at fara í gongd við verkætlanina, fyrr enn neyðug átøk at tryggja haldførið hjá landinum í stutta og langa siktinum eru samtykt av Løgtinginum,

Arbeiðið við at fáa langtíðar javnvág í almenna búskapin kemur at taka nógv ár, og kemur tí at halda fram, samstundis sum víðari fyrireiking av einum Suðuroyartunli verður framd, og eisini aftaná at ein møgulig avgerð um at fara undir verkætlanina er tikin.

Undir yvirskriftini *"Vælferðin í vanda"*, vísir Landsbankin í hoyringarsvari sínum til frágreiðing frá Búskaparráðnum um fíggjarpolitiskt haldføri, sum kom í januar 2024, og sum vísir, at útreiðslurnar komandi árini vaksa skjótari enn inntøkurnar, orsakað av demografisku broytingunum, og at hetta elvir til undirskot á fíggjarlógini og hækkandi skuld. Síðani greiðir Landsbankin frá, at tað at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur merkir, at um neyðug tiltøk ikki verða framd, kann vælferðarsamfelagið ikki tryggja øllum borgarum somu vælferðartænastur sum í dag. Landsbankin vísir á, at ein Suðuroyartunnil bindur landskassan til eina stóra fasta útreiðslu næstu 30-40 árini, sum ikki slepst burturúr, og ger at hallið verður verri næstu 10-15 árini.

Fyrireiking og kostnaðarmeting

Ein partur av hoyringarsvarinum hjá Landsbankanum er greinin "*Er ráðiligt at byggja suðuroyartunnil nú?*", sum liggur á heimasíðuni hjá stovninum.

Landsbankin førir fram, at fyrireikingin av verkætlanini er ikki nøktandi. Mannagongdin, sum er brúkt at gera kostnaðarmeting er ikki nóg góð, og samanborið verður við hvussu gjørt verður í Noregi. Ov stór óvissa er tí um kostnaðin. Verkætlanin er ikki nøktandi góðskutryggjað av 3. parti.

Her skal viðmerkjast, at av tí at verkætlanin er í tveimum stigum, og hetta lógaruppskotið einans loyvir P/F Suðuroyartunnilin at fyrireika og ikki loyvir felagnum at fremja sjálva verkætlanina, er óvissan, sum er um kostnaðin í løtuni, ikki tann stóri trupulleikin, sum Landsbankin vil vera við. Tá verkætlanin er prosjekterað, hevur verið í útboði og tilboð eru komin inn, er óvissan um kostnaðin nógv minni, enn hon er nú. Partar av fyrireikingararbeiðinum er góðskutryggjað av 3. parti, og ætlanin er, at útbjóðingartilfarið skal góðskutryggjast av 3. parti, tá tað er liðugt, og áðrenn verkætlanin fer í útboð.

Kost-nyttu greining og figgingarleistur

Landsbankin vísir á, at kost-nyttu greiningar eru besta amboðið at brúka sum avgerðargrundarlag fyri, hvørjar infrakervisíløgur skulu fremjast. Eitt negativt úrslit av eini kost-nyttu greining merkir, at íløgan eigur ikki at verða framd.

Løgmansskrivstovan tekur undir við, at kost-nyttu greining er týðandi amboð í sambandi við avgerð um infrakervisíløgur. Í 2021 vórðu kost-nyttu greiningar av ymsum møguleikum um farleið millum Suðuroynna og meginøkið, samanborið við verandi farleið, gjørdar til ritið *"Forkanning av einari nýggjari Suðuroyarleið",* sum Landsverk gav út (fylgiskjal 14). Í sambandi við hetta lógaruppskotið hevur Landsverk í 2024 dagført kost-nyttu greiningina fyri undirsjóvartunnil millum Sandvík og Skarvanes, samanborið við verandi sjóvegis farleið. Løgmansskrivstovan metir, eins og Landsverk sigur í lýsingini av kost-nyttu greiningini, at ein kost-nyttu greining sjálvsagt ikki tekur hædd fyri øllum og hevur sínar avmarkingar. Tí kann ein kost-nyttu greining heldur ikki standa einsamøll.

Í kost-nyttu greiningini frá 2021, var eitt positivt úrslit fyri eina nýggja ferjuleið millum Suðuroynna og Sandoynna, meðan greiningin vísti eitt negativt úrslit fyri allar hinar loysnirnar. Tá hugt verður nærri eftir teimum ymsu loysnunum, sum vóru partur av kost-nyttu greiningini í 2021, sæst, brúkaraágóðin av undirsjóvartunli til bilferðslu er virðismettur til úr 736 mió. kr. fyri linjuføringina til Skarvanes og til 957 mió. kr. fyri linjuføringina beinleiðis til Sands, meðan brúkaraágóðin fyri eina nýggja ferjuleið

einans er virðismettur til 105 mió. kr. Tað, sum henda virðismetingin vísir, er, at ein nýggj ferjuleið verður ikki so stórt framstig fyri Suðuroynna sum ein undirsjóvartunnil, brúkaraágóðin av einum undirsjóvartunli er virðismettur upp til níggju ferðir so høgt sum ein nýggj ferjuleið.

Tá Landsbankin førir fram, at íløgur, sum hava negativt úrslit í eini kost-nyttu greining, ikki eiga at verða framdar, skal Løgmansskrivstovan viðmerkja, at Landsverk, sum hevur gjørt kost-nyttu greiningarnar, orðar seg øðrvísi. Landsverk sigur, at um ein kost-nyttu greining hevur eitt negativt úrslit, merkir tað, at íløgan skal ikki gerast av búskaparligum orsøkum. Hetta letur upp fyri, at íløgan kann verða gjørd av øðrum orsøkum, eitt nú einum politiskum ynski um at javnseta ymsar partar av landinum.

Landsbankin førir fram, at myndilin, sum er brúktur at lýsa uppskotið til fíggingarleist, kann ikki brúkast sum grundarlag fyri, um íløgan í ein Suðuroyartunnil skal gerast. Landsbankin førir fram, at tað er ávísur vandi fyri, at tað júst er tað, ið politikararnir gera.

Løgmansskrivstovan er samd í, at myndilin, sum lýsir uppskot til fíggingarleist, ikki kann brúkast sum einasta grundarlag fyri eini avgerð, um íløgan í ein Suðuroyartunnil skal gerast ella ikki, men tað er heldur ikki ætlanin. Um vandi ella ótti er fyri, at onkur greining verður misskilt ella misbrúkt, er loysnin ikki at dylja greiningina, men heldur at royna at lýsa hana betur, og greiða betur frá, hvussu greiningin skal skiljast og kann brúkast. Løgmansskrivstovan metir, at útrokningin hevur týdning, sum eitt av mongum viðurskiftum, sum verða lýst, sum partur av uppskoti til løgtingslóg um ein Suðuroyartunnil.

Mett verður ikki, at ein kost-nyttu greining kann standa einsamøll, tá avleiðingar av eini íløgu skulu lýsast. Í sambandi við fyrireiking av lógaruppskotum er púra vanligt at lýsa nógvar ymiskar avleiðingar. Verkætlanin at gera ein Suðuroyartunnil ávirkar fíggjarlógina yvir eitt áramál, og lántøkan sum verður neyðug í sambandi við verkætlanina ávirkar, hvørjar lánimøguleikar almennu Føroyar hava næstu árini.

Landsbankin førir fram, at myndilin einans vísir, hvussu samansetingin av fíggingini er millum inntøkur frá ferðsluni og játtan á fíggjarlógini.

Løgmansskrivstovan er ikki samd í, at tað einasta, sum myndilin vísir er, hvussu samansetingin av fíggingini er millum inntøkur frá ferðsluni og játtan á fíggjarlógini. Myndilin vísir eisini, hvussu samansetingin er millum innskot og leypandi stuðulsjáttan til P/F Suðuroyartunnilin. Her hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at leypandi stuðulsjáttanin eigur ikki vera størri enn tann sparing, sum verður av, at sjóvegis farleiðin kann niðurleggjast, restin av fíggingini úr landskassanum skal játtast í byggitíðarskeiðnum, áðrenn undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu. Løgmansskrivstovan heldur eisini, at tað hevur stóran týdning at vísa, hvussu stórur partur av kostnaðinum av einum Suðuroyartunli, verður vunnin aftur við at sjóvegis farleiðin kann sparast burtur.

Í skrivinum, har Landsbankin lýsir síni fyrivarni, verður ført fram, at ikki er rætt at brúka kostnaðin av verandi sjóvegis Suðuroyarleið sum samanberingargrundarlag, tí úrslitið verður ov tilvildarligt, tá kostnaðurin í ov stóran mun er ávirkaður av ófakligum politiskum avgerðum. Eitt nú vísir Landsbankin á, at ferðaseðlaprísirnir vórðu lækkaðir í 2007, og ikki eru javnaðir við kostnaðar- ella lønargongdini síðani.

Løgmansskrivstovan skal vísa á, at í almenna kjakinum verða ferðaseðlaprísir við Strandferðsluni javnan samanbornir við gjøldini fyri at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnir. Umframt at undirsjóvartunlarnir geva teimum økjunum lættari atgongd til miðstaðin í Føroyum samanborið við

økini, sum einans hava sjóvegis samband, vilja høgir ferðaseðlaprísir eisini vera við til at økja ójavnan millum økini, tá undirsjóvartunlarnar kunnu lækka gjøldini, so hvørt sum íløgan og lánini verða afturgoldin. Ferðaseðlaprísirnir eru, sum Landsbankin førir fram, politiskt ásettir, men eitt politiskt ynski kann vera um, at ójavnin millum økini ikki skal vera ov stórur. Hetta kann samanberast við, at politisk ynskir ein breiður meiriluti, at fólk, sum verða innløgd á sjúkrahús, skulu ikki rinda fyri hetta, eisini hóast hetta merkir, at útreiðslurnar av heilsuverkinum gerast størri á fíggjarlógini, enn tær høvdu verið, um brúkaragjald varð lagt á tey, sum verður innløgd.

Fíggjarliga rásarúmið

Landsbankin vísir á, at kostnaðurin av einum Suðuroyartunli fer at troðka skilagóðar íløgur burtur í almenna geiranum. Fíggjarmálaráðið vísir á, at verður farið undir verkætlanina, verður væl minni fíggjarligt rásarúm til aðrar íløgur. Ráðið vísir á, at nógvar aðrar almennar íløgur eru, sum skulu gerast næstu 15 árini.

Løgmansskrivstovan tekur undir við, at ein íløga í ein Suðuroyartunnil, merkir, at aðrar íløgur mugu bíða. Tað er og verður ein politisk raðfesting, sum eisini tekur onnur atlit enn búskaparlig og fíggjarlig.

Í skjalinum, sum lýsir tilmæli um fíggingarleist er víst á, at rásarúmið hjá landskassanum verður ávirkað av tí lántøku, sum verður neyðug, fyri at gera ein undirsjóvartunnil til Suðuroynna. Eisini er lýst í skjalinum, at ætlanin er, at innskotið til verkætlanina, sum partapeningur í P/F Suðuroyartunnil, skal raðfestast innanfyri íløgukarmin hjá landinum. Sostatt er tað tikið við, at kostnaðurin av einum Suðuroyartunli fær ávirkan á, hvørjar aðrar íløgur kunnu verða gjørdar.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at ein heimildar- og verklagslóg verður gjørd, og tekur undir við at seta pening av til at lýsa verkætlanina betur, men ráðið heldur, at verkætlanin skal fyrireikast betur, áðrenn hon verður boðin út.

Fíggjarmálaráðið mælir frá, at bjóða verkætlanina út, meðan landskassin enn hevur eina veðhaldsbinding av Eystur- og Sandoyartunlum.

Her skal viðmerkjast, at við verandi gongd fyri ferðslutøl og inntøkur hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar, er ikki ósannlíkt, at felagið hevur javnvág ella avlop í rakstrinum, tá farið verður til næsta stig av verkætlanini fyri Suðuroyartunnilin.

Fíggjarmálaráðið mælir frá at bjóða verkætlanina út, fyrr enn landið hevur sett meira pening í P/F Suðuroyartunnilin.

Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, at tá verkætlanin hevur verið í útboði og tilboð eru komin inn, er kostnaðurin í stóran mun kendur, og tá verður uppskot til fíggingarleist tillagað tilsvarandi. Partur av viðgerðini verður tá, hvussu fíggingin skal samansetast av partapeningi, áðrenn tunnilin verður tikin í nýtslu, og leypandi stuðli eftir, at tunnilin verður tikin í nýtslu. At bíða við at bjóða út til meira peningur er settur í felagið, merkir at pengar verða settir av til eina verkætlan, sum politiska skipanin ikki hevur tikið endaliga støðu til at fremja.

Sjálvsagt ber til at niðurkapitalisera P/F Suðuroyartunnilin aftur, um peningur verður settur í felagið og Suðuroyartunnil kortini ikki skal gerast, men Løgmansskrivstovan metir, at tað er meira týdningarmikið, at gera ein dagførdan fíggingarleist, tá verkætlanin hevur verið í útboði og kostnaðurin

er kendur, og sum tryggjar at partapeningur sum verður settur í felagið í byggitíðarskeiðnum er nóg stórur partur av fíggingini.

Arbeiðsgevarafelagið vísir á, at tað ikki nóg greitt kemur fram í viðmerkingunum, hvør ávirkanin verður av hesi íløguni á fíggjarliga rásarúmið at gera aðrar íløgur.

Ætlanin er, at partapeningurin, sum skal setast í P/F Suðuroyartunnilin, skal takast av íløgukarminum á fíggjarlógini, og verður ávirkanin á rásarúmið til aðrar íløgur avmarkað samsvarandi.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at ráðið heldur, at rættari er at brúka upphæddina 130 mió. kr., sum miðal kostnaður av verandi farleið, og ikki 146 mió. kr., sum eru í uppskotinum.

Viðmerkjast skal, at í uppskoti til fíggingarleist eru útrokningar vístar fyri báðar upphæddir. Løgmansskrivstovan er annars ósamd við Fíggjarmálaráðnum um, hvat rætta upphæddin er at brúka í samanberingini. Løgmansskrivstovan hevur innroknað játtanartørv sambært verandi játtanarskipan, og brúkar áramálið, sum fíggingin er ásett fyri, t.e. 30 ár. Fyri at fáa miðal kostnaðin at vera 130 mió. kr. sambært verandi játtanarskipan, er neyðugt at broyta áramálið til 50 ár. Tað merkir, at roknað verður við 20 árum eftir, at tunnilsíløgan eftir ætlan er afturgoldin, og P/F Suðuroyartunnilin einans skal rinda rakstrarkostnað av tunlinum. Ein slík broyting av fortreytunum fyri útrokningini fer tískil at broyta úrslitið meira positivt til frama fyri at fremja íløguna í ein Suðuroyartunnil enn tey úrslit sum fyriliggja í verandi uppskoti til fíggingarleist.

Fleiri verklagslógir

Fíggjarmálaráðið mælir til, at atknýttar verkætlanir verða koyrdar í sjálvstøðugar verklagslógir fyri at tryggja, at tær verkætlanirnar verða fyrireikaðar og projekteraðar, áðrenn verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið.

Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, at atknýttar verkætlanir verða eisini partur av tí lógaruppskoti, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið, áðrenn verkætlanin kann fremjast. Væntandi verður talan um eina, og ikki fleiri verklagslógir, men tó verða einstøku verkætlanirnar lýstar. Verkælanin at dagføra vegin gjøgnum Sandalíð verður tó fyri seg í sjálvstøðugari verklagslóg.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tørvur er á at kanna, um verandi farleið til Suðuroyar kann rekast skynsamari og effektivari, herundir um prísir kunnu tillagast.

Viðmerkjast skal, at hetta lógaruppskotið ikki hevur nakrar ásetingar um verandi farleið til Suðuroynna, og tað er Fiski- og samferðslumálaráðið, sum umsitur Strandfaraskip Landsins, og harvið verandi farleið. Fíggjarmálaráðið kann taka hetta upp við Fiski- og samferðslumálaráðið, eitt nú í sambandi við komandi fíggjarlógarviðgerð.

Alment innlit

Undir hoyringartilgongdini hava fleiri víst á, at tað ikki er ásett í lógaruppskotinum, at P/F Suðuroyartunnil er fevnt av innlitslógini og fyrisitingarlógini, og undir hoyringartilgongdini er hetta blivið umrøtt sum ein trupulleiki, tí almenningurin fær ikki innlit í arbeiðið, sum P/F Suðuroyartunnil ger.

Løgmansskrivstovan vil vísa á, at heimild er í § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina og § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg at seta, bæði innlitslógina og fyristingarlógina, í gildi fyri P/F Suðuroyartunnilin við kunngerð. Verður lógaruppskotið samtykt, verður støða tikin til, um og í hvønn mun hetta verður gjørt. Løgmansskrivstovan skal eisini vísa á, at orsaka av fyrilitum fyri komandi útboði, og fyri at verja fíggjarliga áhugamálini hjá P/F Suðuroyartunlinum og hjá tí almenna, er onki alment innlit í kostnaðarmetingini sbrt. løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, § 13, nr. 5 og nr. 6. Í sambandi við eitt útboð kann kunnleiki til mál lutirnar í kostnaðarmetingini ávirka tilboðsgevararnar og hava við sær, at prísurin á verkætlanini verður hægri enn neyðugt.